FF bladið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 305 Hósdagur 13. november 2003 10,-

# Søgan um Jørgen á Nesi

Síða 11

## Dimmalætting í herna móti egnum landsmonnum

Dimma berjist, at føroyingar við upp til 15 ára starvsaldur missa arbeiðið til útlendingar.

Síða 10



## Tíðindi frá Fiskamarknaðinum

Greitt verður frá nýggjari landingarmiðstøð á Tvøroyri, og at útróðrarfiskurin skal kunna seljast, áðrenn hann verður avreiddur.

Síða 20



Síða 14

# Fiskivinnan í Canada

Vit hava hitt fiskimannafelagsformann í Canada og síggja hvussu laksur fer til fiskamjølsframleiðslu.

# Minningarhald um tey sjólátnu

Vit hava frásøgn úr Havn og Porkeri

Síða 22 & 24









FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

FF-blaðið: Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
Útgevari: Føroya Fiskimannafelag

Blaðstjóri: Óli Jacobsen
Layout: Føroya Fiskimannafelag
Prenttilgerð: Føroya Fiskimannafelag
Prent: Prentmiðstøðin

Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin

- kemur út annan-hvønn hósdag









# Føroyingahavn í Vestur Canada

Tað skal fyrst sigast, at tann føroyingahavn, sum vit fara at greiða frá í hesi grein, hevur einki við Føroyar at gera. Men her varð arbeitt eftir somu prinsippum sum í Føroyingahavnini, nevniliga at vera ein rættiligur, livandi býur á sumri við nógvum virksemi, meðan hann var deyður um veturin.

Í aðrari grein í blaðnum í dag er greitt frá fiskivinnuni í Prince Rupert, sum er ein tann størsti fiskivinnubýur vestantil í Canada.

Í hesum sambandi varð eisini vitjað á North Pacific Historic Fishing Village, sum liggur einar 30 km frá Prince Rupert í Port Edward, sum annars er ein bygd við 800 fólkum.

**Gomul fiskakonservesverksmiðja**

Hetta er ein gomul fiskakonserves verksmiðja, ið er gjørd til fornminnissavn. Áhugað kunnu koma higar og uppliva fiskivinnu, sum hon var í gomlum døgum har á leiðini.

North Pacific er tann mest fullfíggjaða konserves verksmiðjan, sum er varðveitt á amerikansku vesturstrondini. Seinast í 1800- talinum vóru nærum 1.000 slík virki spjadd um alla norðuramerikansku vesturstrondina frá sunnast í California og til Alaska í norði. Av hesum vóru meira enn helvtin bygdafyritøkur, sum lógu við ein áarmunna norðalaga í British Columbia, sum er vestasti landspartur í Canada. Frá mai til september arbeiddi her



*Fram við sjóvarmálanum.*




*Hetta er høvuðsbygningurin.*

ein blandaður hópur av fólki. Her vóru fiskimenn, bátabyggjarar og verksmiðjuarbeiðarar við húskjum. Á vetri rýmdu øll, og tað sum var eftir, var ein spøkilsisbýur. Men eftir, at tey flestu av hesu virkjum eru farin, liggur North Pacific her og kann fortelja sína søgu um farna tíð.

Verksmiðjan við øllum tí, sum hoyrir til, liggur við munnan á Skeena River, og hon varð bygd í 1889. Bygt varð á pelar, sum vórðu settir niður í sjógvin. Sum aðrar líknandi fyritøkur, var henda stórt sæð sjálvberandi og skuldi klára seg uttan samband við onnur. Her var: konserves verksmiðja, hús fyri leiðararnar, hús fyri arbeiðsfólkið, fyrstahjálpsstøð, skúli, kirkja, ein messa, handil - rikin av fyritøkuni, skrivstovur, verkstøð, bedingar og so ein hópur av bátum, sum avreiddu laks til verksmiðjuna. Vegurin í bygdini vóru brettir, somuleiðis á pelum - og vegurin førdi til tey ymisku húsini.

Tað var nærum bert møguligt at koma við báti til nógvar av hesum verksmiðjubygdunum. Í onkrum førum slapst onkuntíð við toki ella eftir vegum.

Dósirnar vóru gjørdar við hond

Arbeiðsfólkið í North Pacific verksmiðjuni var sera blandað frá byrjan av. Kinesiskir arbeiðarar framleiddu dósirnar við hond, japanskir arbeiðarar bygdu bátar til verksmiðjuna, og indianarar, menn og kvinnur, arbeiddu á verksmiðjuni, bøttu gørnini og veiddu. Og av laksi var nóg mikið at fáa, og tað var laksurin sum var grundarlagið fyri virkseminum.

Øll hesi búðu í bygdini hesar longu summardagarnir í sesongini.

Her kundu búgva upp til 2.000 fólk. Og gjørdist bygdin eitt fyridømi fyri tollyndi millum ymisk fólkasløg.

Virksemið hjá hesi verksmiðju vardi frá 1889 til 1958. Eina ferð var roynt aftur, men hetta gjørdist bert eitt ár og var hetta í 1972. Men við frystiboksum í hvørjum heimi var ikki longur sami tørvur á dósamati.

Her var eisini eina fiskamjølsverksmiðja sum virkaði slógv frá laksi, og virkaði hon frá 1954 til 1981.

Í 1989, tá 100 ár vóru liðin síðan virksemið byrjaði, varð økið lýst at vera friðað av myndugleikunum.

Í dag ber til hjá ferðafólki at upplivað alt hetta, so frægt sum tað letur seg gera. Her er eisini ein stór myndaframsýning sum sera livandi lýsir lívið tá í tíðini. Her eru ferðavegleiðarar, sum vísa runt og greiða frá. Her er so nógv at síggja, at mælt verður til at nýta ein hálvan dag her.

Tað ber enntá til at gista her. Her vóru og eru 28 bygningar. Ein av hesum er riggaður til 28 kømur, sum kunnu leigast til ferðafólk. Á hendan hátt ber til at koma enn nærri hesi glæsiligu fortíð hjá fiskivinnuni á økinum.

Alt hetta minnir sera nógv um lívið í Føroyingahavnini, har gongdin var mestsum tann sama, tó við tí undantaki, at í Føroyingahavnini vóru húskini ikki við.

Tá sagt varð, at North Pacific einki hevur við Føroyar at gera, var tað løgi, at dagin eftir, at vit vitjaðu, var ein fundur um oljuvinnu. Her er nevniliga eisini møguligt at hava fundir. Og fyrilestrarhaldari hendan dagin var júst ein føroyingur, nevniliga Jón Mikkelsen, sum vit hava umrøtt í seinastu bløðunum.

Tað var í hvussu er spennandi at síggja hetta fornminni. Vónandi halda okkara lesarar tað sama.



*Á fiskivinnusavninum er nógv at síggja, m.a. línureiðskapur, sum minnir nógv um okkara. Línurennan líkist eisini tí, sum vit kennast við. Hendan er gjørd úr timbri.*

# Kókibók eisini fyri teir siglandi

Nú um dagarnar kom út ein nýggj kókibók, "Lætt og leskiligt", ið er skrivað av Jóhannu á Tjaldrafløtti og Elisabeth Akursmørk. Tað serliga við hesi bókini er, at her er fyrst og fremst talan um heilsugóðan mat, sum bæði er lættur at gera, og sum er leskiligur.




*Fiskimannafelagið sendir hesa bók umborð í hvørt skip.*

Tær báðar, sum hava skrivað bókina, hava ein serligan førleika. Tær undirvísa á húsarhaldsskúlanum í Klaksvík, og tær hava útbúgving innan matgerð eins og tær hava nógvar aðrar royndir á hesum øki.

Her eru uppskriftir til allar tær máltíðir, sum eitt húsarhald hevur. T.d. eru úti við 20 døgurðarættir, fyrst og fremst úr kjøti og fiski.

Henda bókin fellur væl saman við okkara royndir at fáa teir sum sigla at eta meira sunnan mat.

Vit hava umrøtt hetta fleiri ferðir áður, nevniliga at lívið umborð á einum skipi í ein ávísan mun kann vera ein hóttan móti heilsuni. Hetta sæst m.a. á B8 á landssjúkrahúsinum, har fiskimenn eru sera "væl" umboðaðir í mun til aðrar samfelagsbólkar. Og her kunnu matvanar væl spæla inn. Tað er nevniliga ikki vist, at fyri tað, at talan er um "góðan" mat, at eisini er talan um "sunnan" mat.

Men her hava vit ein møguleika fyri ay bøta um hetta. Tí hevur stjórnin í fiskimannafelagnum eisini samtykt at senda bókina umborð á øll skip, har limir felagsins eru við. Vit vóna, at hetta stuðlar teirri hugburðsbroyting, sum eisini skal til fyri, at bøta um kostvanar. Sjálvandi rokna vit eisini við, at bókin verður brúkt.



*Jóhanna á Tjaldrafløtti er føðslu- og húsarhaldsfrøðingur og hevur m.a. starvast sum lærari á kokkaskeiðnum hjá Klaksvíkar Sjómansskúla. Síðan november 1994 hevur hon verið leiðari á Húsarhaldsskúla Føroya.*



*Elisabeth Akursmørk er økonoma og hevur m.a. starvast á Landssjúkrahúsinum og Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hon hevur síðan august 1995 verið lærari á Húsarhaldsskúla Føroya.*

Vit hava ikki havt møguleika roynt bókina enn. Men vit hava biðið ein royndan kokk um at hyggja bókina ígjøgnum og at gera ein meting av, hvørt hon kann brúkast umborð á einum skipi.

Hansara fyrsta fráboðan er, at hetta tykist at bera væl til, og hann vil geva bókina sítt besta viðmæli, eisini til nýtslu umborð á skipi.

Bókin er sera snotilig og væl úr hondum greidd. Tað er lætt at finna fram til tær ymisku uppskriftirnar, so bókin kann uttan iva vera eitt gott íkast til sunna matgerð sovæl á landi sum á skipi. Tað er óneyðugt siga, at tørvurin á sunnum mati er ikki minni á landi.

Tað verður spennandi at frætta, hvussu bókin fer at roynast í verki, men hetta fara vit vist at hoyra nakað um sum frá líður.



FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 305 - 13. november 2003

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein



Okkara maður í Grønlandi, greiðir dag fyri dag frá tí, sum er hent, síðan seinasta blað. Hetta eru tíðindi, sum vit vita, verða lisin við áhuga.

30. oktober

Í dag eru 2,3 kuldastig og eitt lot av norði.“Lovise L” kom inn í dag at landa. Teir hava knapt 19 tons av jákupskel inni, teir hava fiskað í 23 dagar.

Eg fekk eini tíðindi úr Íslandi frá øðrum skiparanum á trolaranum “Ingimundi”. Teir hava verið úti í 3 dagar og hava 70.000 pund inni. 50.000 pund av hýsu og 20.000 pund av toski. Hýsuna senda teir til England, men prísurin er lágur á hýsuni, tí at føroyingar fiska nógva hýsu.

31.oktober

Nógvar rækjur

Í dag eru 7,5 stig kuldastig og lot av eystri.“Lómur” kom inn í morgun at landa. Teir hava um 70 tons av ísaðum rækjum.

Tann 28. okt. fekk eg nøkur tíðindi úr Canada. Tað er “Polar Nattortalik”, sum fiskar rækjur fyri ein canadiskan trolara, sum fekk havarí herfyri. Teir byrjaðu fiskiskap tann 23. okt. og hava 140 tons inni eftir 6 døgum. Veðrið hevur verið skiftandi; teir liggja saman við “Kinguk” og “Atlantic Enterprice”. Teir liggja í einum øki, sum eitur A2, og tað eru góðar rækjur teir fáa. Teir skulu landa í Nuuk tann 13. november. Áðrenn hetta rendið til Canadiskan sjógv, byrjaðu teir túr her í Grønlandi tann 8 sept, og teir gjørdu 1 ½ túr í Vesturgrønlandi. Teir fingu knapt 970 tons fyri ta tíðina. Meiningin var, at teir skuldu fara til Eysturgrønlands at royna, men teir blivu ístaðin sendir til Canada at fiska.

Veiðutjóvurin slapp undan

Grønlandsposturin skrivar, at kriminellur EU trolari kann ikki ákærast. Málið um tann tikna spanska trolaran, sum royndarfiskaði eftir høggusløkki fer, sum nú er, í vaskið. Tað er Direktoratet for Fangst og Fiskeri sum hevur klutrað í málinum.

Spanski trolarin “Ivan Nores”, bleiv meldaður tann 24. okt. av DFFiskeri til løgregluna. Direktoratið er av teirri fatan, at “Ivan Nores” hevði eitt serligt EU loyvi at royndarfiska eftir høggusløkki, eftir eini royndaravtalu millum Grønland og EU. Men, í staðin fyri høggusløkk, fiska teir svartkalva. Tað vísur seg, at í lastini á “Ivan Nores”, eru 45 tons av svartkalva og ongin høggusløkkur at síggja.

Hann kann ikki rættarfylgjast kortini fyri ólógliga veiðu. Politiið fór umborð á “Ivan Nores” hósdagin í síðstu viku. Teir lógu í Nuuk. Eftir tí, politiassessor Bjørn Bay sigur, eru allar skipslogbøkur gjølla gjøgnumhugdar. Umframt hevur ein offiserur frá landi hugt í lastina. Har var onki at koma eftir hjá teimum. Alt var lógligt, sum teir sóðu.

Longu 21.-22. okt. staðfesta teir á DFF, at “Ivan Nores” ikki yvirheldur avtaluna at fiska eftir høgguslokki. DFF átalar trolaran, og áleggur honum at steðga ólógligu veiðuni eftir svartkalva. Aftaná tað verður loyvið tikið frá “Ivan Nores”. Ongin bót ella ákæra. Eftir hetta sigur politiið, at málið er úti av veiðini. Bjørn Bay sigur, at bæði politiið og Grønlands Kommando hava leysgivið “Ivan Norres”. Tað er upp til DFF at tingast við trolaran um, hvat málið skal enda við. Frá DFF sigur skrivstovustjórin Frants Heilmann, at tað verður ikki reist ákæra ímóti “Ivan Nores”. DFF sigur at royndarveiðan heldur fram við EU aftaná hesa hending.

2. november

Í dag eru 8,2 kuldastig og lot av suðri. Eg frætti, at “Polar Nattoralik” fekk gott 40 tons niður í gjár.

3. november

Í dag eru 12,2 kuldastig og stilli. “Polar Nanok” kom inn at landa. Teir hava gott og væl 300 tons av rækjum. Teir rokna við at fara nýggjan túr ímorgin.

4. november

Í dag eru 12,8 kuldastig og stilli. Ein av teimun størru krabbabátunum riggar av fyri veturin. Teir siga, at tað blívur minni og minni fyri hvønn túr. Teir hava drigið gott 2.000 teinar og løgdu knapt 2,8 tons av livandi krabba upp í dag. Teir hava mist gott 200 teinar herfyri úti í Holsteinsborgdýpinum. Teir siga, at meiningin var, at teir skuldu fara út eftir restini, sum stendur eftir, og so dreggja eftir teimum mistu teinunum.

Eg fekk tíðindi frá Rógva Joensen, sum er við tí spanska krabbaskipinum. Teir hava fingið um 1,5 tons av lidnari vøru niður um samdøgrið. Tann stóri krabbin er rímiliga góður. Teir hava uml. 35 tons inni. Tað, sum hevur givið teimun fyrimunin, er, at veðrið hevur verið so gott. Men har suðuri høvdu teir nógvar bakkdagar. Hann veit ikki nær teir fara at gevast, men í fjør gjóvust teir 24. nov. Men verður hampuligt veður, og nakað av krabba fæst, so roknar hann við, at teir gevast seinri í ár enn í fjør.

Senda óviðgjørdar vørur av landinum hóast arbeiðsloysi

Grønlandsposturin skrivar í dag, at Royal Greenland hevur yvirtikið øll partabrøv í Uniprawn A/S, sum eiga trý rækjuvirkir í norður Noreg. Hetta upplýsir stjórin Keld Askær. Teir áttu 22 procent av partabrøvunum í øllum virkjunum. Konsernin yvirtekur øll partabrøv og vil hereftir bjóða Unipraws teimum, sum reka virkini, at keypa seg inn í tey. Keld Askær sigur, at keypið av Unipraws, ongan týdning fær fyri framleiðsluna í Grønlandi. Unipraws vørurnar skulu seljast ígjøgnum søluskrivstovuna hjá Royal Greenland í Europa. Uniprawns hevur haft tað ringt í fjør. Í vár var talan um at senda fólk heim frá teimum trimum virkjunum. Men í juni var fíggjarstøðan blivin betri fyri tey tvey av virkjunum. Men tað blivu 100 fólk send heim frá tí nýggja virkinum í Skjervøy. Síðani hevur virkið ligið stilt. K Askær sigur í tíðindaskrivi, at tey tvey virkini, sum koyra, halda áfram. Men “problembarnið” á Skjervøy skal nútímansgerast og skal so opna aftur í 2004. Tá so alt kemur at koyra, sum tað skal, koma teir at hava ein umsetning uppá 250-275 milliónir norskar krónur. Grønlandsposten skrivar eisini um, at meðan virkini í Pamiut og Qasigiannguit mangla rávøru til at virka, senda vit 8.000 tons av ikki viðgjørdum svartkalva av landinum.

Samb. eini rapport, sum Danmarks Fiskeindustri og Eksportforening hevur latið gjørt fyri tey síðstu 4 árini, hevur Grønland sent 6.000-8.000 tons av óhagreiddum svartkalva av landinum. Hetta hendir nú, meðan Royal Greenland er við at lata roykivirkið í Pamiut aftur. Teir roykja annars fløk av svartkalva frá virkinum frá Qasigianngiut og Umanak. Tann óvirkaði svartkalvin svarar til 35 procent av tí samlaðu veiðuni inni við land. Stjóri Hendrik Leth í Royal Greenland sigur, at svartkalvin verður viðgjørdur soleiðis, at høvd og sporl verður skorið av. Tað er ein vøra, sum teir selja til Japan og Thailand. Hann sigur, at tað eru bert fløk, sum vera roykt í Pamiut, har teir ætla at lata aftur. Tað er tí at tað er ógvuliga dýrt at senda vørur til virkið, og tað hongur tí ikki saman í longdini. Afturlatingin hendir, hóast teir hava fingið 10 mill. í innspræning frá landskassanum í summar.

Eg tosaði við ein mann higani, sum hevur fiskað krabbar síðani tað byrjaði. Hann sigur, at teir hava fiskað 50 procent minni í ár enn í fjør. Men, sum hann segði, so var innhandlingsstop í summar, og so var eingin høggusløkkur at fáa til agn. Tað mundi ganga ein mánaði, teir lógu stillir. Men, leggur hann afurat, at tað er hjá øllum, at tað er gingið aftur á við krabbafiskiskapinum. Hann sigur, at tað eru givin alt ov nógv loyvir, so ansið tykkum heima í Føroyum við at geva fleiri loyvir. Grønland hevur høast alt nógvan sjógv rundan um landið. Tað kann man ikki siga um Føroyar.

Góður prísur fyri fugl

Annars eru jollunar her byrjaðar at fáa svartfugl. Veiðitíðin byrjaði 16. okt. Teir, sum liva av at fiska og at veiða, hava loyvi at skjóta tað, teir hava patrónir til, og vit, sum eru til verka hvønn dag, hava loyvi at skjóta 10 tandur fyri túrin. Men tað er lógligt at fara til lands við teimun fyrstu 10 skotunum, og so avstað aftur við fleiri skotum. Prísurin er høgur. Á brettinum, sum vit kalla, kostar lomvigi í heilum líki 30 kr stykki. Ein roytt lomviga kostar meira enn ein høsnarungi ella næstan sum ein dunna, nevniliga 50 kr fyri ein fjarðaleysan lomviga. Tað sær út, sum at svartfuglurin ikki er komin inn undir land her á okkara leiðum, og so er tað, at veðrið hevur verið so avbera gott hesa seinastu tíðina.

5. november

Í dag eru 12,9 kuldastig og blikalogn. “Aqviq” úr Halifax kom inn at landa rækjur í dag. Teir hava 220 tons inni. Trolbassin er av Viðareiði. Hann er einsamallur Føroyingur við. Teir hava gjørt fleiri túrar her norðuri í canadiskum øki. Teir hava nú kókað alt, sum teir hava fingið. Nakað er støddin 90/120 og so 120/150 pr. kg. Ein annar trolari, “Mersey Phoenix”, hevur rokast saman við teimum. Hann hevur fiskað við trimum trolum í senn. Skiparin á “Mersey Phoenix” var um borð á “Aqviq” ein dagin. Tá hann sá trolið hjá teimun, segði hann í spølni, at trolið hjá “Aqviq” var ikki størri enn ein leykposi, aftur ímóti teirra troli. Teir fóru inn til Canada at landa. Teir hava vist havt 25 dagar um henda túrin. Teir hava gott 800 tons av rækjum inni. Teir hava gjørt tríggjar túrar og fiskað gott 2.500 tons. Tað sær út til, at tað er nokk til av rækjum í canadiskum sjógvi. Men støddin er onki at tosa um her norðuri. Tað er betri slag, teir fáa har suðuri, ið “Polar Amarok” og “Atlantic Enterprice” royna.

6. november

Ójavnt við krabbum

Í dag eru 14,2 kuldastig og stilli. Ójavnt er við krabbunum. Í dag sá eg ein lítlan bát leggja 90 kassar av krabba upp. Hetta eru úti við 2 tons. Teir høvdu drigið 300 teinar inni á einum fjørði. Ein annar hevði eini 1,5 tons. Teir høvdu drigið knapt 200 teinar, teir høvdu standandi í munnanum á Iterleqfjørðinum. “Aqviq” fór út í kvøld nýggjan túr.

Eitt sindur um tann spanska trolaran “Ivan Nores”. Grønlands Posturin skrivar í dag, at Amalia Jessen, stjóri í Direktoratet for Fangst og Fiskeri, sigur:“Vit hava fingið reyð oyru av hesum máli. Vit standa maktarleys í málinum, tí ein av eftirlitsmonnunum hjá GSLK Fiskarílicenckontórinum hevur, uttan okkara vitan, givið “Ivan Nores” loyvi at fiska á ávísum økjum. Hon viðgongur, at hetta er ein álvarsamur samarbeiðstrupulleiki millum DFF og Fiskarí licenckontrollin, sum skal rættast.

Uppá fyrispurning um, hvussu hevur EU reagerað, sigur hon, at vit eru samd við EU um, at royndarveiðan skal halda fram, men at leibeiningarnar vera strammaðar upp.

“Ivan Nores” fekk ongan høggusløgg, men 45 tons av svartkalva, sum eru fiskað ólógliga. Teir kunnu sigla út úr grønlendskari havn við 45 tonsum av svartkalva uttan at gjald nakað sum helst. Og, sum um tað ikki var nóg mikið, so hevur “Ivan Nores” fingið nýtt fiskiloyvi at royndarfiska í Grønlendskum sjógvi árið út.

7. november

Í dag eru 12,3 stig kuldastig og eitt lot av eystri. “Lómur” kom inn at landa. Teir hava um 70 tons av ísaðum rækjum. “Helene L” kom inn at umvæla ljóskastara. Teir hava landað krabba norðuri í Assiat. Seinast høvdu teir 2 tons av livandi krabba. Teir hava drigið 300 teinar, sum teir áttu her útfyri. Meiningin er at teir skulu norður eftir, at seta teinarnar saman við teimun, sum standa har norði. Tað vóru 19 kurvar í teimun 300 teinunum.

“Helene L” er byrjað at leita eftir krabba norður av Stóra Hellefisk Banka. Tað sá ikki so galið út á dýpi, sum var eitt sindur grynri enn teir vanliga fiska her í økinum. Tað, sum teir drógu, áðrenn teir komu inn, var 1 kg uppá teinin. Tað sjáldsama er, at nú tosa krabbabátarnir saman og royna at leita á hvør sínum økið, og so boða frá hvussu hevur gingist. Ein annar glotti er, at bátarnir hava fingið krabba, á økjum niðri við Kangamiut. Við ísblinkin er svart, og tað sama við Fiskanesleiðina, har er bleytur krabbi.

# Des í Jónas Broncksgøtu

Tá vit í dag tosa um Jónas Broncksgøtu, seta vit hesa gøtu í samband við Almannastovuna og Politistøðina, sum mestsum er miðbýur.



Soleiðis sær út í dag, har desin var fyri 100 árum síðani.



Desin.

Men hetta hevur ikki altíð verið so. Vit hava frá Súsonnu Gustafsson, hjá Hedvig hjá Knúti, lænt hesa forvitnisligu 100 ára gomlu myndina av, tá hetta økið var bøur, har hoyggjað varð. Myndin vísir, tá des varð gjørd. Tað eru kanska ikki øll, sum í dag vita, hvat ein des er. Men hetta var útihoyggj, sum eisini er greitt frá í frásøgnini hjá Hammershaimb. Tað er tann gamli Knút skómakarin, sum eigur desina. Hann búði júst har, sum Almannastovan er nú, og trøðin hevur so verið á somu leið.

Ovast á desini er tann gamli Heini á Trøðni. Ovast á stiganum er Knút. Fremst t.h. á myndini er dóttir hansara, Malla, sum seinni giftist við Pola skómakaranum. Aftanfyri Mallu standa tveir dreingir. Annar er Petur Alberg og hin er Petur, sonur Knút. Teir eru systkinabørn. Tað er eitt sindur ógreitt, hvørt er hvør, men vit gita, at tann størri er Petur hjá Knúti. Hann gekk burtur við skipi ungur. Næst teimum báðum situr Isalina, kona Knút. Gentan næst henni er Anna, seinni gift Ziska, systir Petur Alberg.

Vit vita ikki, hvørji hini eru. Men vit vilja fegin frætta, um onkur skuldi vitað.

# Desasneið

Í samband við okkara frálíku mynd av desini, har tað nú er miðbýur í Havn, fara vit at endurgeva ta "fólkalívsmynd" um desasneið, sum V.U. Hammershaimb hevur skrivað. Hon lýsir sera væl tað, som gongur fyri seg á myndini. Greinin er skrivað fyri meira enn 100 árum síðan, og vit endurgeva frásøgnina, sum hon er skrivað. Vit síggja, at skriftmálið er broytt rættiliga fitt hesa tíð.

Ilurin var farin úr sátunum, tær vóri signar og góðar at fløa, og fláirnar passaliga fastar at binda í byrðar. Tíðin var komin at bera hoyggj; hoygarðurin var reinsaður, hoystøðið ruddað, og strá og hoybos millum steinarnar í tí pilkað burtur, fólkið biðið at bera sum fyrst ið líkindi vóru at taka á. Tað er ein strevin dagur, og tó sýtir eingin maður, sum biðin er, at koma; tí har verður ikki spart at veita tað, ið húsið formár; men aðra løn fyri tað stranga arbeiði verður ikki talað um. Tað eru tólv kúfóður, sum standa í sátum á bønum, og skulu vera borin inn; tjúgu menn eru bidnir at koma, allir hava játtað. Teir eru komnir saman hjá bóndanum økt til dags, og allir siga við einum munni, at dagurin verður góður, og so verður tikið á at bera. Men fyrst verður ein breyðflís skorin til hvønn mann og skonkt honum upp í glasið, so fara teir hvør við sínum reipi úr hestafaxi, heldin er bundin í á miðjuni, reipið er kastað um øxlina og so er farið avstað við skjótheit á nýlendisstykkini at bera hetta hoyggið, sum óvandað er at geva neytum, niðast á støðið. So hvørt menninir eru komnir aftur við fyrstu byrðini og hava loyst hana úr reipinum at rysta út á støðið, koma teir inn at fáa kaffi, og tá verður hugaliga borið um eina økt utan nakra hvíld; nú er morgunmatur kókaður; saltskerpukjøt av einum gamalseyði við jørðeplum, smør og breyð, skonkt uppí glasið, og nú er aftur farið at bera alt í einum, til stóra des er liðug. Tað er ein løgin sjón at síggja menninar koma eftir bønum undir byrðunum; tær ganga høgt upp um høvdið og taka niður móti knæsbótunum, tað er sum hoyggið sjálvt er blivið livandi og hevði fingið bein at ganga á, tí lítið sæst av monnunum, sum bera tær, utan sjálv beinini. Ein stovnur av gomlum hoyggj stóð eftir frá árinum framman undan; hann var tikin og lagdur í miðjuna á desini, at ilurin ikki skuldi vera ovnógvur. Nú er desin hækkað so, at menninir ikki longur kunnu ganga á plankanum upp at hana við byrðunum; tær verða tí lagdar í hoygarðin, og tá má kastast upp til teirra, sum eru uppi á henni. Kastingarglasið verður kraft, og bóndin kemur út við fløskuni at skeinkja. Tað fækkar nú um teir, sum skulu bera; tveir mega vera uppi á desini, fýra til at kasta, ein til at skapa hana, langtrø skulu setast undir, hvar neyðugt gerst, sátustaðir skulu rakast upp úr vøllinum at turka í sólini og berast inn og gerast upp eitt hoyggj fyri seg. Desin hækkar skjótt, nú komið er um sneiðing og hon er farin at tynnast; har er alt tað fína hoyggið av tí fornu jørðini borið í, og nú verður kraft síðari hoyggj av tvævetursjørðini, sum betur er at kemba niður á síðurnar at verja fyri, tá ið regnar inn á. Nú er komið upp undir kjøl, kjalarhoyggj valt at leggja í hann; desin er smalkað so, at menninir sum uppi á eru, gleiva um hana, meðan ið teir sita og kjala, og so verða bendlarnir blakaðir upp til teirra; væl má vera kastað, og væl má verða loftað av teimum, sum uppi á sita; so strúka teir hoyggið slætt og leggja bendul við bendul – ein hond ella ein løgd ímillum hvønn – og senda tá endarnar niður til teirra, sum báðuminni standa at taka við teimum og binda klíggjasteinar í. Nú er hin stóra desin liðug, lína verður kastað upp, sum teir lesa seg niður av hoynum, so verður kembt runt og beltið bundið utan á bendlarnar um desina. Teir setast tá allir til borðs at eta døgurð: kjøt og súpan; tí bóndin hevir verið á fjalli og tikið gimbralond at hava til desasneiðina.

Hvar ein maður er biðin um at bera hoyggj, er konan og børnini boðin við til desasneiðina, so tað er ofta hálvthundrað ella meira, sum eru at geva mat tann dagin. Konur og gentur verða settar til arbeiðis at gera bendlar av síðum hoyggj, børnini at henta grót til at klíggja við, til at bera sátustaðarhoyggj og annað; – alt gongur við gleði og teiti tann dagin. Døgurðin er etin, og í skunding verður tað lítla hoyggið gjørt, sløðið á gøtuni og í hoygarðinum er kastað upp í, og so fara tey at dansa og kvøða eina løtu; mjølgreyturin er upp úr oystur, hann verður sopin, og so er sagt: "góða nátt! og takk fyri meg!" Allir eru móðir; summir taka um nakkan; hann er stívnaður av teimum tungu byrðunum, ið fatlaðir eru soleiðis, at reipið liggur fram á pannuna, so øll tyngdin hvílir á henni, herðunum og hálsinum. Soleiðis gongur hoyberging hjá teimum, sum eiga væl av jørð, men smámaðurin, sum lítið eigur og ikki hevur meira enn part í einum kúfóðri, verður tó ikki óhjálpin, men leggur so saman sítt hoyggj við ein annans; hevur hann triðing ella fjórðing í kúfóðri, fær hann mjólkina av kúnni triðja ella fjórða hvønn dag, so leingi tað drýpur undan henni, og fær tó so eina mjólkasopa í húsið, og drýggjar sær tað tá sum best við at leggja undir til fleytir at hava aftur við køkubitanum ella greyti.

# Akkerið á "Polo" komið til Svínoyar

Í Svínoy er eitt akker komið at liggja mitt í bygdini. Tað fekst uppspurt, at hetta var akkerið av "Polo". Tann "heimskendi" svínoyingurin, Jukim Olsen, hevði funnið akkerið úti á Strondum og hevði fingið loyvi til at fáa tað við sær til Svínoyar.



*Akkerið, sum nú er komið til Svínoyar aftur.*

Tað er heldur eingin ivi um, at tað er júst í Svínoy, at eitt slíkt akker hoyrir heima, tí tað eru ikki øll skip, sum í hugaheiminum eru so samantvinnað við eina bygd sum júst "Polo".

Skipið varð keypt í 1929, og hon var triðja skansaskonnartin, sum kom til landið. Teir, sum keyptu skipið, vóru Kjølbro, Símun hjá Póli og Jógvan Zachariassen. Hon var trímastrað og barkentinuriggað og fekk motor ísettan, tá hon kom. "Polo" var 110 føtur og var fyrsta skip í Norðoyggjum longri enn 100 fót í longd.

Símun førdi skipið alla tíðina, tað var til fiskiskap fram til 1951, tá hann seldi sín part til Kjølbro. Aftaná hetta sigldi "Polo" við frakt.

Teir sum seinni áttu "Polo" vóru Peter Dahl og Jákup á Lag. Seinast í 60-unum sigldi "Polo" á land inni á Strondum. Tá keypti Sámal Petur í Selvindi á Strondum saman við Dánjal J. Vilhelm "Polo". Tá hevði hon sæð sínar bestu dagar. Teir tóku tað burturúr skipinum, sum kundi brúkast. Dánjal J átti nevniliga "Yvonnu", sum hevði sama slag motor. Seinni varð "Polo" søkt. Men akkerið varð tó bjargað á land og hevur ligið á Strondum. Og tað er her, at Jukim er komin fram á tað, og Sofus, sonur Sámal Petur, hevur verið so beinasamur at lata tað til Svínoyar bygd, har akkerið í dag minnir um eina glæsiliga tíð í bygdini.

Skiparin, Símun, var jú svínoyingur. Tað kann nevnast, at hann var beiggi til ta 101 ára gomlu Mallu Jacobsen, sum er kend av okkara lesarum. Tað vóru annars hennara synir og abbasynir, sum fingu flutt akkerið til Svínoyar.

Teir flestu fiskimenn í Svínoy mundu sigla við "Polo". Tað er áhugavert í bókini hjá Edvardi Jacobsen, mann Mallu og tískil svági Símun, at síggja manningarlistarnar fyri tey ymisku árini.

Í 1937 t.d. vóru 37 mans við "Polo" tilsamans. Meðan tað nóg illa er skipsfiskimaður í Svínoy í dag ,vóru hetta árið 17 svínoyingar við. Og meðan tað eisini nóg illa er skipsfiskimaður við Gjógv í dag, vóru tá 6 gjáarmenn við. Ein av hesum var Dánjal Klein, sum seinni gjørdist formaður í FF. Í 1951 vóru heilir 10 gjáarmenn við. Menn sigldu eisini við ár um ár, so teir hava trivist væl umborð.

Men "Polo" hevði størri týdning fyri Svínoy enn júst hetta. Ofta var veiðan landað í Svínoy, har hon varð turkað til klippfisk. Hetta gav, sum vera man, ein hóp av arbeiði til heimafólkið.

Her kann nevnast, at fleiri mans av Kirkju sigldu eisini við. Ein teirra var Líggjas, beiggi Eliesar, sum er kendur av okkara lesarum. Teir flestu av hinum vóru systkinabørn Eliesar.

### Bert ein skipari á "Polo"

Hetta er eitt orðatak, sum øll kenna, og sonur Símun, Páll, greiðir frá upprunanum í bókini hjá Edvardi. Tað kundi verið stuttligt í samband við søguna um akkerið at endurtikið hesa frásøgn. Hon er henda:

Símun var friðkærur maður, spakur og hjartagóður, uppalari, frægur av havsins synum, og kom hetta heiminum hjá tveimum av systrunum væl við, tá tær tíðliga gjørdust einkjur. Sjálvreypi átti hann ikki part í, var hittinorðaður sum fáur og við hugnakveikjandi skemtingarlyndi sum eyðkenni. Tað sat, sum hann segði, eisini tað sum teskandi gleið honum um varrar við vinsemisbrosi á kinn. Tað gav at bíta, hinaferðina maskinbáturin hekk í taklunum, skutin ov langur at ganga tvøran inn millum rigningarnar og í tilevnaða "stólinum" mitt á dekkinum. Mælskir gjørdust menn í orðadrátti, hvørt fram- ella afturendi fyrst skuldi stingast inn millum rigningarnar. Tá kom hann stillførur upp úr kahúttini, sáttliga spákandi fram eftir dekkinum, meðan tað lat í onkrum: "Nú kemur skiparin!" Tøgn fall á, nú hann spakførur tók leiðsluna, og sum smurt kom báturin uppá pláss. Tá læt í onkrum, hvussu villiga tað gekst til síðst - tá var tað, at Símun við brosandi skemtingarsemi helt fyri: "Tað er bert ein skipari umborð á "Polo"." Mundi tað vara nakran, at hetta skuldi gerast eitt tiltak til denna dag?



*Jukim talar í kirkjuni í Svínoy yvir bygdarmannin Poul Meyer.*



*Hetta er málningar av "Polo", sum Benny Drewsen hevur gjørt.*



*"Tað er bert ein skipari á "Polo", nevniliga Símun Poulsen.*

**SELIR TÚ**

**skipa- ella bátaútgerð?**

So er FF-blaðið einasti holli boðberin, sum fer umborð á skipini – umvegis reiðaríini – hvønn útgávudag.

Gerið eina skilagóða lýsingaravtalu við okkum.



***Ringið tlf. 31 21 69 & 44 80 01***




# Meira um sjónvarps-gjaldið

Í seinasta blað høvdu vit eina grein, har tað varð staðfest, at fólk verða “fuppað” at gjalda sjónvarpsgjald.

Hetta verður gjørt við at senda brøv út til øll omanfyri 18 ár við fráboðan um, at tey hava skyldu at gjalda sjónvarpsgjald, um tey hava egið sjónvarp.

Um tey ikki gjalda innan 10 dagar, kunnu tey roknað við at fáa vitjan av eftirlitsfólkunum hjá sjónvarpinum, uttan at tað verður útgreinað hvørjar heimildir hesi hava.

Hetta bræv verður sent, hóast tað stendur greitt í lógini um kringvarp:

*Ongum húski kann verða álagt at gjalda meira enn eitt sjónvarpsgjald.*

Tað sama stendur um útvarpsgjald. Tað er sjáldan, at ein lógaráseting er so greið sum hendan. Tað er avgjørt eingin ivi um, at heimabúgvandi børn 18 ár og eldri eru partur av sama húski sum foreldrini. Og tí er als eingin heimild til at krevja tey eftir sjónvarpsgjaldi.

### Kunngerðin í stríð við lógina

Tað sum eisini kann staðfestast er, at hetta bræv verður sent út samb. eini kunngerð sum upplagt er í stríð við lógina um kringvarp.

Fyrst skal sigast, at tað ber kanska ikki til at leggja núverandi leiðslu í sjónvarpinum til last, at hon fylgir eini kunngerð, sum er henni til fyrimuns.

Og tað er væl eisini “normalt”, at leiðslan heldur fast um sín órætt, tá víst verður á, at hetta ikki ruggar rætt.

Tað nýggja í málinum er annars, at kunngerðin fyri innkrevjing av sjónvarpsgjaldi er óbroytt á hesum øki frá byrjan.

Hetta merkir, at sjálvt um løgtingið hevur samtykt eina greiða broyting í lógini fyri sjónvarps- og útvarpsgjald, so hevur almenna umsitingin í síni tilevning av kunngerð látist sum at lógin als ikki er broytt! Hetta kann bert fatast sum ein váttan av teirri lýsing av almennu fyrisitingini, sum vit hava so ofta hava havt her í blaðnum.

### Tað er ikki bannað at nýta vit og skil

Annars skuldi vanligt vit og skil sagt teimum á sjónvarpinum, at fasthaldan av eini greitt ólógligari kunngerð er ikki haldbart. Skuldi í hvussu er ikki verið tað. Fólk kunnu jú sjálvi fara inn á alnótina og lesa hvat ið stendur í lógini. Og bert út frá hesum kunnu tey bert látast sum einki. Onnur kæra, og tað er greitt at hetta hava fleiri gjørt til Mentamálráðið. Og tað skal nú meira enn “góður vilji” til at halda fast um eina managongd, sum er grundað á eina kunngerð, sum so greitt er beint ímóti eini løgtingslóg.

Ein slík kunngerð letur seg als ikki umsita. Hvussu skal sjónvarpið kunna staðfesta, hvør ið eigur eitt sjónvarp í einum kamari í einum húsi. T.d. um tann ið býr í kamarinum er 17 ella 18 ára gamal.

### Óheimilað hóttan um vitjan av eftirlitsfólki

Hóttanin um “vitjan av eftirlitsfólki”, sum er ein fortreyt fyri at hetta teoretiskt kann gerast, man eisini liggja á markinum til hvat er loyvt. Hvørki í lóg ella kunngerð sæst at vera nøkur sum helst heimild til eftirlitisfólk yvirhøvur, og enn minni til at senda tey á kroppin á fólki.

Kunngerðirnar fyri útvarps- og sjónvarpsgjald eru einsljóðandi og báðar ólógligar. Tað má eisini vera avdúkandi fyri “skilið”, at tveir líkastillaðir almennir stovnar umsita einsljóðandi reglur so ymiskt. Útvarpið heldur seg nevniliga til lógina!

Eitt úrslit av brøvunum frá sjónvarpinum er annars, at tey eru nøkur sum hava goldið, fyrst og fremst grundað á umrøddu hóttan um at fáa vitjan av eftirlitisfólki. Tey flestu látast bara sum einki. Og tað hendir einki meira við teimum. T.v.s. at summi gjalda og onnur ikki!

### Jánkasligur landsstýrismaður

Málið hevur eisini verið uppi og vent í løgtinginum vegna fyrispurning hjá Kristian Magnussen.

Samb. útvarpinum var reaktiónin hjá landsstýrismanninum á økinum henda:

*Anita á Fríðriksmørk, landsstýrismaður, upplýsti í tinginum í dag (mikudagin í seinastu viku), at ein nýggj og endurskoðað kringvarpslóg kemur fyri tingið í hesi tingsetuni, væntandi um ein ella tveir mánaðir. Í hesi lógini verða eisini greiðari ásetingar um innkrevjingina hjá sjónvarpinum og útvarpinum.*

Hetta má nú sigast at vera ein sera jánkaslig støða. Fyri tað fyrsta hevur hetta mál ikki tað minsta við eina komandi kringvarpslóg ella kunngerð at gera. Her er talan um verandi lóg er brotin ella ikki. Fyri tað næsta er verandi lóggáva so greið sum hon yvirhøvur kann vera.

Hetta er eitt støðuloysi sum ikki boðar frá góðum, men sum annars er í samsvar við ta rættarfatan sum annars er galdandi fyri politisk/umsitingarligu skipanini.

### Verður ikki endurtikið!

Upplýsingarnar um nøvn og bústað hevur sjónvarpið fingið frá landsfólkayvirlitinum, har sjónvarpið sigur seg hava eitt standandi loyvi at fáa slíkar upplýsingar.

Men so mikið er komið burtur úr okkara skriving um hetta mál, at eitt slíkt skriv verður ikki sent aftur. Sjónvarpið skal framyvir hava loyvi í hvørjum einstøkum føri frá Dataeftirklitinum at venda sær til fólk á hendan hátt. Og brøv við einum slíkum innihaldi fáa ikki eitt slíkt loyvi.

Menn vit bíða frameftir eftir at frætta hvat løgtingsmenn siga til, at teirra samtyktir verða ignoreraðar á hendan hátt. Og hvat skal henda við teimum kr. 1.000 sum fleiri hava goldið uttan at hava skyldu til tess.

§ 20. Til Sjónvarp Føroya skal rindast sjónvarpsgjald. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvør skal rinda sjónvarpsgjald, hvørji tól koma undir gjaldsskyldu, og nær gjaldsskyldan byrjar ella heldur uppat. Ongum húski kann verða álagt at rinda meiri enn eitt sjónvarpsgjald.

*Hetta er tað, sum kringvarpslógin sigur um sjónvarpsgjald. Tað er tann seinasta reglan, sum er avgerandi fyri, hvør ið skal gjalda sjónvarpsgjald. Og hetta kann ikki á nakran hátt misskiljast.*

§ 2.Tað í § 1 nevnda gjald er galdandi fyri sjónvarpsmóttakarar, ið verða nýttir av gjaldaranum ella húsfólki hansara, sum hann er uppihaldari hjá.
Stk. 2. Sjálvstøðugt gjald verður goldið fyri sjónvarpsmóttakarar, sum ikki koma undir reglurnar í stk. 1:

*Hetta er kunngerðin fyri sjónvarpsgjald. Tað merkisverda er, at í henni er als ikki tikin hædd fyri, at lógin er broytt. Tí er hon beinleiðis ólóglig.*

*Burtursæð frá tí, hevur sjónvarpið “snarað” orðingina um, at gjaldið eisini umfatar tey sum gjaldarin er “uppihaldari hjá” til, at hetta er bert galdandi fram til hesi fylla 18 ár. Tað kunnu vera fleiri hugsunir um hetta. Mong foreldur meta seg avgjørt at vera uppihaldarar hjá 18 ára gomlum børnum sum ganga í skúla.*

## Vaðhorn Seafood gjørdist Ársins Virki 2003

**Nógv var gitt millum teir 350 luttakararnar á Vinnudegnum, um hvør í ár fór at fáa heiðurin. Men spenningurin helt sær fram til avdúkingina, tá greitt var, at Ársins Virki einaferð enn var eitt virki úr Eysturoynni: Saltfiskavirkið Vaðhorn Seafood á Strondum gjørdist Ársins Virki 2003**

Dómsnevndin hevði hesa grundgeving fyri at velja Vaðhorn Seafood:

“Í metingargrundarlagnum verður støði tikið í hesum krøvum:

§ Virkið skal hava víst framfýsni og áræði innan eitt nú útflutning, vørumenning, tøknifrøði, útbúgving ella innan annað øki, og hetta skal eftir styttri áramál hava viðført menning og vøkstur.

§ Virkið skal hava verið støðugt/vaksandi, og dentur verður lagdur á fíggjarligt úrslit seinastu árini.

§ Virkið skal vilja trína alment fram sum vinnari av kappingini sum Ársins virki.

Eins og hini trý árini, ið ársins virki hevur verið valt, hevur nevndin eisini hesaferð lagt dent á, at ársins virki skal hava givið gott fíggjarligt úrslit - verð sterkt og støðugt. Men í mun til hini árini, er valið í ár ikki fallið á eitt stórt virki, heldur eitt lítið virki innan sína vinnugrein, sum hevur lagt seg eftir serframleiðslu, við góðum úrsliti.

At vit hava óstøðug viðurskifti í føroyskari fiskivinnu, bæði á sjógvi og landi, er einki nýtt. Fleiri virki innan fiski- og alivinnu í Føroyum geva hendinga góð úrslit einstøk ár, men fá eru, sum so javnt í mun til støddina kunnu vísa eins gott rakstrarúrslit og støðugt vaksandi soliditet, sum PF Vaðhorn Seafood á Hulki á Strondum. Góðu úrslitini stava ikki frá, at virkið hevur funnið eitt loynimið, men heldur, at tað hevur lagt seg eftir serframleiðslu til útvaldar keyparar og málrættað alt virksemi eftir hesum. Sjálvt um virkið eigur meirilutan í línuskipið við fiskiloyvi undir Føroyum og Íslandi, fær hetta ikki ávirkan á framleiðsluna hjá Vaðhorn Seafood. Hon er lagað eftir ynskjunum hjá kundunum, og virkið kann við einum nútímans hugtakið verða kallað eitt “just in time” saltfiskavirki.

Hjá fyritøkuni er talan um eina tilvitaða virkisskrá, men umstøðurnar fyri hesi menning hava eisini verið til vildar, nevniliga ein uppboðssøla, har virkið kann keypa júst ta nøgd av ráváru, sum henni tørvar, í røttum støddarbýti og við tí feskleika og hagreiðing, sum tørvar til vøru, sum keyparin ynskir.

Virkið hevur duga at bygt upp, dygt samstarv við útlendskar keyparar og lagað innkeyp og framleiðslu eftir teirra eftirspurningi. Og Vaðhorn hevur duga at hildið fast í góðum kundum.

Saltfiskur er ein gomul siðbundin vøra, og nógv spáddu at henda vøra fór at fara í søguna. Men føroysku virkini, harímillum Vaðhorn hava gingið á odda at endurnýggja hesa vøru - øll liðini frá ráváru til kunda - so hon hóskar til nútímans brúkaran. Og Vaðhorn hevur framum nakran dugað at fingið fíggjarlig úrslit burtur úr tí sera góða umdømi, sum føroyski saltfiskurin hevur á suðurevropeisku marknaðunum.

Fyritøkan hevur eisini havt hegni at tryggja sær neyðuga gjaldføri til keyp, virking, goymslu og flutning.

Virkið er í dag eitt trygt og gott arbeiðspláss fyri umleið 40 fólkum, sum eru í støðugum arbeiði. Tað hevði í fjør eitt ognaravkast upp á 26 %, eitt eginpeningsavkast upp á 35 % og við einum eginpeningi upp á góðar 21 mió. kr. ein soliditet upp á 73 %. Úrslitið hjá virkinum fyri hvørt kilo av ráfiski skarar framúr sammett við onnur fiskavirki, og nevndin hevur tí ikki ivast í at valt Vaðhorn Seafood til ársins virki 2003.”

Jógvan Gregersen, stjóri á Vaðhorn Seafood, tók ímóti heiðursprógvinum og standmyndini.

## Nordisk Nettverkssamling

Tórshavn, Færøyane
fredag 21. nov. - søndag 24. nov. 2003

Fredag 21. november
Müllers pakkhus

1700 Åbning Hjalti í Jákupstovu,
1710- 1800 Arne Nørrevang, prof. emer., Føroyar Fróðskaparsetur. Kartlægning af sjøbunden ved Færøyene. Jan Sørensen, direktør for BIOFAR Knud Simonsen, Cand. scient. Strømkart på PC. Hjálmar Hátún, Cand. scient. Havstrøme nord for Færøyene
1900 Fiskesuppe. Jóan Pauli Joensen. Færøske mattraditioner.
Trio, Kristian Blak, klaver, Rebecca Blak, violin, Jákup Lutzen, violin.
1900-2000 Bogi Hansen, Fiskerilaboratoriet, Tórshavn. Havstømme ved Færøyene. Eilif Gaard, Fiskerilaboratoriet, Tórshavn. Planteplankton og dets betydning for muslinger ved Færøerne

Lørdag 22. november.
Nordens hus

0830-0930 Markedsadgang: En stor felles utfordring for nordisk skaldyrnæring. Hvordan samhandle i en situasjon der de store aktørene vokter på sin monopolstatus. Kort innledning, korte innlegg fra de enkelte nordiske land. Diskusjon
0930-0955 Anette Ungfors, Sverige. Västkustkrabban – ett svenskt samarbetsprojekt mellan fiskare och forskare
0955-1040 Astrid Woll, Norge. Ressursundersøkelsen (oppsummering av loggbokregistreringene samt tilstøtende aktiviteter som størrelse ved kjønnsmodning). Karsten Krog, Danmark. Status for det danske krabbefiskeri. Diskusjon: Markedsutvikling og produktutvikling.
1040-1100 Pause
1100-1145 Gudrun Thorarinsdottir, Ísland: Siste års utvikling på skaldyrfronten. Valdimar Gunnarsson, Island: Blaaskjell opdræt i Island
1145-1230 Bjørn Lindblad, Sverige. Status i svensk musselnäring. Ulike prosjekter. Anders Granhed, statusrapport Ejdersskrämma for musselodling
1230-1400 Lunch. Drýlur (brød uten ger) med sjømat.
1400-1425 Frans Høyer, Danmark. Statusberetning for Dansk Skaldyr Center og opdrættere i Danmark.
1425-1445 Ditte Tørring. Blåmuslinge- og østersprojektet
1445-1510 Sofus Poulsen, Rækju- og Skeljavirki, Oyri.
1510-1530 Marni Simonsen, Skaldyrsexportør, Argir.
1530-1600 Kaffepause
1600-1615 Gunnar Eiken, Norge. Utvikling av skjellnæringen i Norge i 2003.
1615-1630 Alf Albrigtsen. Lite utnyttede arter
1630-1700 Árni Nicolajsen, Fiskerilaboratoriet, Tórshavn. Krabbefiskeri ved Færøyene.
1700-1730 Birger Enni, Norðlýsið. O-skjell fiskeri og produktion ved Færøyene.
1730-1800 Ulf Syversen. Presentasjon av Interreg-prosjekt Bohuslän/Østfold. Spørsmål og diskusjon
2000 Festmiddag med fisk og skaldyr. Musik: Trondur Enni, Brandur Enni og Sámal Ravnsfjall.

Søndag 23. november
Müllers pakkhus

0930-1000 Tom Goodlad, Shetland. Blåskjellupdrett ved Shetland.
0930-1000 Tummas Arabo. Nordisk råd og samarbejde.
1000-1200 Opsamling og debat.
1400-1800 Udflugt. Reje- og skaldyrsfabrikken, Oyri, Østerø. Tjørnuvík, Strømø. Udgravninger af vikingebostederne.

### "Uppruddingin" í fiskimálaráðnum:

# Lopið varð uppumm, har garðurin var lægstur!

Í samband við ta sokallaðu "uppruddingina" í fiskimálaráðnum, kann tað vera uppá sítt pláss, at útgreina nøkur viðurskifti.

Løgmaður hevur sjálvur váttað í sjónvarpinum í seinastu viku, at tað er hann, sum hevur evstu ábyrgd av umsitingini, sum tann, ið skal hava eftirlit við, at landsstýrismenn røkja sítt starv á fullgóðan hátt. Ta beinleiðis ábyrgdina hevur so landsstýrismaðurin á økinum gjøgnum sín aðalstjóra.

Skipanin er tann samb. stýrisskipanarlógina, at landsstýrismaðurin hevur ta dagligu ábyrgdina av øllum, sum hendir í hansara umsiting, uttan mun til um hann veit av, hvat ið verður gjørt.

Hendir nakað óregluligt aftanfyri hansara rygg, so er tað tí, at hann ikki hevur tryggjað sær, at slíkt ikki kann henda. Hesum hevur hann eisini ábyrgdina av.

Ábyrgdin hjá løgmanni liggur sum sagt í tí, at hann hevur skyldu at hava eftirlit við, at landsstýrismenninir røkja sína uppgávu á ein fullgóðan hátt.

Í hesum døgum hevur sitandi løgmaður havt hesa uppgávu í hálvt sætta ár.

Tá hann nú knappliga aftaná alla hesa tíð staðfestir, at óskil er í fiskimálaráðnum, so reisir hetta av sær sjálvum tann spurning, um ikki løgmaður sjálvur hevur svikið sína eftirlitsskyldu!

Spurningurin er so, um hetta er gjørt við, at løgmaður als ikki hevur gjørt sína skyldu at fylgja við, hvat ið hendir í teimum ymsu aðalráðunum, og her í fiskimálaráðnum.

Ella um hann hevur vitað av skilinum, men bert hevur latið standa til.

Løgmaður letst at vakna við kaldan dreym, tí ein blaðmaður ikki hevur fingið innlit í eitt mál innan ásettu freistina og hetta førir til átalu frá umboðsmanninum. Út frá hesum verður givin tann fatan, at løgmaður er óvitandi hvat ið hendir á økjum, har hann hevur eftirlitsskyldu.

### Løgmaður hevur sjálvur lagt leistin

Men veruleikin er verri enn hesin. Hann er nevniliga tann, at løgmaður sjálvur hevur lagt leistin fyri hesi umsiting, sum hann í dag er noyddur at ásanna, milt sagt ikki riggar sum tað skal.

Leistin legði løgmaður í viðgerðini av yrkisráðnum hjá lønjavningargrunninum. Løgmaður fekk løgtingið at avtaka hetta ráð við teirri grundgeving, at tað stríddi ímóti stýrisskipanarlógini.

Í januar 1999, ella fyri knøppum fimm árum síðani, sendi FF løgmanni eitt bræv, har spurt varð eftir tí løgfrøðisliga grundarlagnum fyri hesi grundgeving.

### Hesin fyrispurningur er yvirhøvur ikki svaraður

Men kanningar, sum vit sjálvir hava gjørt hava víst, at í málinum var nevniliga eingin løgfrøðislig meting, sum undirbygdi hetta sjónarmið. Umrødda lóg var, samb. okkara kanningum hjá fremstu serfrøðingum í ríkinum, fult út í samsvar við stýrisskipanarlógina, og hetta var annars eisini sjónarmiðið í fiskimálaráðnum!

Av hesi orsøk kundi løgmaður ikki svara hesum fyrispurningi og valdi tí lættastu loysnina, nevniliga at látast sum einki. Harvið hevur løgmaður sjálvur lagt tann leistin, at passar tað ikki umsitingini at svara einum fyrispurningi, so letur hann fyrisitingarlóg vera fyrisitingarlóg.

Síðan tá hevur einki mál viðvíkjandi fiskimonnum, sum vit hava reist yvirfyri fiskimálaráðnum, fingið nakra málsviðgerð yvirhøvur. Men hví skal umsitingin halda fyrisitingarlógina, tá sjálvt løgmaður ikki ger tað!

At hetta er "málsviðgerðin" í fiskimálaráðnum hevur løgmaður verið fult út greiður yvir. Tað er greitt frá hesum her í blaðnum, í ársfrágreiðingum hjá FF og í dómum, sum eru sagdir.

Afturat hesum hevur hann persónliga gjøgnum løgmansstjóran fingið eina nágreiniliga frásøgn um hesi rættarbrot.

### Skuldi bjarga Jørgen

Men løgmaður hevur ikki látist um vón. Ikki fyrr enn stólurin fer at rilla undir Jørgen Niclasen í vár raknar hann við. Men hetta var bert ein desperat roynd at bjarga skinninum á Jørgen, hvørs embætisførslu hann annars hevur hildið hondina yvir. Og tað er eisini Jørgen, ið sum landsstýrismaður, hevur høvuðsábyrgdina av tí samb. løgmanni staðfesta óskilinum.

Sjálvsagt er tað útmerkað, at umboðsmaðurin fær løgmann at rakna við. Men eitt eftirlit, sum bert skal virka, tá landsstýrismálanevndin og umboðsmaðurin gera bart, er ikki sannførandi. Løgmaður var undan aktuella málinum greiður yvir, at mál hava ligið longri óavgreidd enn hetta.

### Funnu syndabukk

Úrslitið av "uppruddingini" hesa ferð, er, at ein av teimum smáu fiskunum er uppsagdur. Hetta minnir nú nógv um sakina hjá Jákup Mørkøre, tá topparnir avráddu at kasta júst tann fyri úlvarnar, sum var lættasta offur. Seinni er Jákup fullkomiliga reinsaður.

Og nú verður tað sama gjørt aftur í fiskimálaráðnum, og hetta verður kallað "upprudding". Og nú er umboðsmaðurin kanska nøgdur!

Hetta er annars so ússaligt og so ómansligt, at tað finst ikki orð fyri tí. Hví í víðu verð skal ein meinigur medarbeiðari nú útrópast sum brotsmaður, tí tað er júst hann sum hevur havt aktuella málið um hendir, tá hann ikki hevur gjørt annað enn øll onnur í skipanini íroknað løgmanni.

### Hava pumpað umsitingina upp

Veruligi trupulleikin er nógv meira grundleggjandi. Almenna umsitingin er hesi seinastu árini bólgnað sum aldri fyrr. Hetta er gjørt púra óskipað at fylla umsitingina við fólki uttan at ásett er nøkur sum helst mannagongd fyri nakað sum helst.

Eitt so avgerandi øki, sum ein skipað mannagongd fyri hvussu viðurskiftini við borgaran skulu skipast finst ikki. Tað skuldi tá verið grundleggjandi at hava eina skipan, sum ásetti hvussu eitt mál skal greiðast, frá tí tað kemur inn um hurðina á einum aðalráð, og til tað fer út aftur.

Og steðgar so málið upp skuldi skipanin lofta hesum, so stig verða tikin at fáa málsviðgerðina víðari.

Hetta skuldi verið ein høvuðsuppáva hjá einum løgmanni. Men tað verður í hvussu er ikki hesin løgmaður, sum fær skil á hesum.

Tað er lætt at staðfesta, at rættartrygdin í umsitingini er verri í dag, enn tá Anfinn Kallsberg tók við sum løgmaður. Hann hevur persónliga, sum virkandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, beint fyri tí møguleika, sum fiskimenn hóast alt høvdu at fáa síni mál viðgjørd. Og hann hevur einki gjørt fyri at nakað annað skal koma í staðin.

Her krevjast aðrar útskiftingar enn tann sum nú ofraður.

FF-blaðið | www.fiskimannafelag.fo

# Elfelagið SEV søkir elektrikara

Til Innleggingardeildina hjá SEV verður sókt eftir fólki við sveinabrævi sum elektrikari ella við aðrari javnbjóðis útbúgving.

**ARBEIÐIÐ** umfatar tekniskt eftirlit, skráseting, kanning og útskifting av elmálarum v.m. í sethúsum og øðrum líknandi elinnleggingum kring landið.

Við tað, at arbeiðsøkið fevnir um alt landið, kann roknast við nógvari ferðing, sum í stóran mun fer fram við arbeiðsbili hjá SEV. Neyðugt er tí, at viðkomandi hevur koyrikort til vanligan persónbil.

Nakað av skrásetingarbeiði verður, og kann tí roknast við upp til ein dag um vikuna, har arbeitt verður við teldu.

**LØNIN** verður tímaløn sambært sáttmála millum Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Møguliga kann ein viðbót afturat tímalønini koma upp á tal seinni.

**ARBEIÐSSTAÐIÐ** (uppmøtingarstaðið) er ikki ásett enn, men verður nærri avtalað við tann, ið settur verður. Staðið verður í Vestmanna ella í Tórshavn ella kanska í Skálafirði.

**NÆRRI UPPLÝSINGAR** um starvið kunnu fáast við at venda sær til Eyðun S. Olsen, deildarleiðara ella John P. Danielsen, skrivstovustjóra á tlf. 346800.

**UMSÓKNIR** saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast Elfelagnum SEV, Box 319, Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 18. november 2003.

# Skrivstovufólk søkist til Elfelagið SEV

Eitt hálvdagsstarv sum skrivstovufólk á skrivstovuni hjá SEV í Havn er leyst at søkja.

**STARVIÐ:** Arbeiðstíðin er mánadag til hósdag kl. 1215 til 1600 og fríggjadag kl. 1215 til 1530.

Starvið umfatar at passa telefonvekslaraskipan okkara umframt smærri fyrifallandi skrivstovuarbeiðsuppgávur.

**FØRLEIKAKRØV:** Starvið krevur ikki nakra formliga yrkisútbúgving, men við tað, at SEV hevur í ávísan mun samskifti við útheimin, er neyðugt at kunna samskifta á skandinaviskum og enskum.

**LØNIN:** Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið í I. ella II. lønarflokki, alt eftir útbúgving og starvsroyndum.

**UPPLÝSINGAR UM STARVIÐ:** Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til John P. Danielsen, skrivstovustjóra á tlf. 346800.

**UMSÓKNIR:** Umsóknir saman við møguligum prógvum og ummælum skulu sendast Elfelagnum SEV, Box 319, 110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 18. november 2003.




stephanssons hús

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Tlf. +298 31 11 55
Fax +298 31 11 25
e-mail: info@faroeyard.fo

**P/F Skipasmiðjan á Skála**
Tlf. +298 44 11 55
Fax +298 31 44 25
e-mail: skala@faroeyard.fo

**Vestmanna Skipasmiðja**
Tlf. +298 42 40 10
Fax +298 42 40 05

**Runavíkar Mekaniski Verkstaður**
Tlf. +298 44 70 36
Fax +298 44 78 34

**www.faroeyard.fo**

# Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- ***avrúsan og viðgerð***
- ***einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)***
- ***samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)***
- ***eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi***

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75

# Dimmalætting í herna móti føroysku manningini á "Norrönu"


Pólendingar eiga ongan góðan í Føroyum

Mannamunur: Smyril Line hevur boygt seg fyri Fiskimannafelagnum og sett fleiri av uppsagdu føroyingunum aftur. Samstundis eru allir pólen

HEINI GAARD

*Brot úr grein á síðu 3 í Dimmalætting nr. 211.*

Málið um uppsagnirnar á "Norröna" hava verið viðgjørdar sakliga av øllum miðlunum uttan av "Dimmalætting".

Hon er farin í eina sanna herferð móti føroysku manningini á "Norrönu". At henda herferðin eisini er ímóti fiskimannafelagnum og Óla Jacobsen taka vit meira lætt. Dimmalætting og hennara arvaða leiðsla kann ikki gerast nøkur hóttan móti FF.

Men ein slík nærum óndsinnað skriving kann skaða áhugamálini hjá teimum føroyingum, sum eru við skipinum. Og tað er upplagt tað sum er ætlanin.

Tað er ikki tað. Vit hava roynt at greiða Dimmalætting frá, hvat hetta mál snýr seg um. Tað er í stuttum:

1. Manningin á gomlu "Norrönu" fekk tilsøgn um at fáa starv við teirri nýggju. Hvør av manningini fekk tískil persónliga avtalu um at vera í starvi í eitt ár. Hesi fólk hava verið í starvi í upptil 15 ár ella meira.

2. Polakkarnir fingu tilsøgn um at vera við summarsiglingina, og fekk hon avtalu um starv í eitt hálvt ár.

Men her nyttaði einki at greiða frá nøkrum. Niðurstøðan var gjørd, og hon skuldi ikki broytast. Smb. Dimmalætting er tað eitt "brotsverk", at FF heldur fast um hesar avtalur, og kann hetta bert skiljast sum at Dimmalætting stingur sínar egnu landsmenn í ryggin fyri at kunna hunddálka FF.

Blaðið fer enntá so langt, at tað roynir at misteinkiliggera okkara upplýsing um, at ein av teimum uppsøgdu er komin umborð aftur, men í einum øðrum starvi.

Tað er óneyðugt at gera viðmerkingar til eina slíka skarnsgerð móti egnum landsmonnum.



## Kennir nakar nakran á hesi myndini?

Vit hava lænt hesa myndina frá Hjørdis Háberg. Hetta er helst antin ein skipsmanning ella ein skiparaflokkur.

Men kann nakar siga okkum nakað um hesa myndina. Tað at Hjørdis eigur hana kundi bent á, at hon hevur okkurt samband við hennara ætt inni á Skálafjørðinum.




**Vit gera allar vanligar bilumvælingar sera bíliga - so sum:**

Oljuskift, motorjusteringar

Umvæla bremsir, koplingar v.m.

For- og bakhjólsleiðir og akslar

Og so hava vit tey vælumtóktu "TYFOON" dekkini, sum vit skifta

**Sp/f Úrvalsbilar**

FO-530 Fuglafjørður

Tlf. 444943 · 281943 · 217704

AGN



sild
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur

hava dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR

STRENDUR - telefon: 447720
ella 448095 - fax: 448744

SENT VERÐUR VIÐ STRANDFERÐSLUNI

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

**Pf. Petur Larsen**

Tlf: 44 41 74

Fax: 44 42 85

# Søgan um Jørgen á Nesi

**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 11, 12, 17 og 18 kunnu takast úr blaðnum**

Tann 8. apríl 1961 helt Olaf Petersen, gamli lærarin á Argjum, fyrilestur í Útvarpi Føroya um Jørgen á Nesi, sum fleiri ferðir er umrøddur her í blaðnum, seinast í røðini um Onnu Evensen. Vit hava fingið handritið frá abbadóttir Jørgen, Hjørdis Háberg, sum í dag fyllir 87 ár. Vit hava eisini lænt flestu myndirnar í greinini frá Hjørdis.
Hetta er framvegis ein frásøgn, sum er áhugaverd, og tað ivast vit ikki í, at okkara lesarar eisini halda.



*Olaf Petersen, sum hevur skrivað frásøgnina.*

Í dag 8. apríl (1961) eru 50 ár liðin síðani Jørgin Davidsen á Nesi saman við tveimum abbabørnum sínum druknaði útfyri Hvítanesi á veg úr Tórshavn, og hesi orð, eg her vil bera fram, skulu verða teimum til áminningar.

Við tað, at bæði hansara foreldur, David Mathiassen og Kristianna Joensdatter, vóru ættaði úr Tjørnuvík og komu út á Nes at búgva fyri umleið 140 árum síðani, loyvi eg mær at fara norður hagar fyrst og greiða nakað søguligt frá ættarfólki hansara, áðrenn eg sigi meira um Jørgin á Nesi og hansara seinastu og sorgfullu sjóferð.

Á skjalasavninum her í Havn er eitt serliga forvitnisligt yvirlit yvir ta fyrstu regluligu fólkateljingina fyri allar Føroyar, ið fór fram 1. februar 1801. - Tá var Tjørnuvík ein forholdsvís stór bygd við 12 húsum og 65 íbúgvum, og íbúgvaratalið fyri allar Føroyar var 5.265.

Eg skal bert dvølja við tey bæði húsini, sum Dávur og Kristianna vóru ættaði úr. - Foreldur Dáva itu Mathias Hermansen og Malena Joensdatter. Tey áttu 8 børn, 3 synir og 5 døtur, og Dávur, sum í 1801 var 8 ára gamal, var tað sætta í flokkinum. - Foreldur Kristionnu itu Joen Mikkelsen og Susanne Heinedatter. Tey áttu bara 2 børn tá, Kristionnu og Mikkjal, ein dóttur kom afturat seinri, hon doyði ógift. Kristianna var í 1801 4 ára gomul.

Jógvan, ið var elstur av brøðrunum, veit eg einki at siga frá, hann man helst vera deyður á ungum árum. Hinir báðir Herman og Dávur vuksu upp har norðuri og skuldu vera sera raskir unglingar.

Um hetta mundi, meðan teir vóru smádreingir, leyp uppgongdin uppá Tjørnuvíkar stakk. Hetta var ein stórur missur fyri bygdina ikki at sleppa á Stakkin, tí hann var tá sum nú eitt tiltikið fitilendi, og í Stakkslíð var ein mongd av lunda. Tjørnuvíkingar royndu at sleppa upp á øðrum stað, men royndin miseydnaðist - ein maður fall og doyði, og teir royndu ikki aftur tá. Tað gingu so 7 ár, eingin var á Stakkinum. Mattrot gjørdist í Føroyum - og tað í stórum, tí alt skipasamband millum Danmarkar og Føroyar var hindrað av krígsávum. Tað var um hetta mundi, at Nólsoyar Páll hvarv við mann og mús. Tá vóru brøðurnir Herman og Dávur komnir til mans, teir vildu sleppa at royna av nýggjum at koma uppá Stakkin. Teir gomlu bóru seg undan og vóru trekir at koma við teimum, men roynt varð kortini. Søgan sigur, at Dávur kleiv upp við eini smekrari línu í hondini, meðan bróðurin Herman, ið var tvey ár eldri, stiðjaði hann. Royndin eydnaðist. Dávur kom upp, og bjargalína varð løgd á Stakkin. Tá livdi bert ein veðrur eftir. Hann gekk har so hallur við bert einum horni.

Brøðurnir við Gjónna, Janus og Per, ið vóru tiltiknir grótmenn og jarnsmiðir, vórðu bidnir at koma norð, og teir hjálptu Tjørnuvíkingum at festa ringar í bergið, og síðani tá hava teir havt samband við Stakkin.

Ein kann samanlíkna eina ættartalvu við eitt træ, ið veksur og skýtir nógvar greinar, og hesar aftur aðrar o.s.fr. og soleiðis er við hesum báðum húsunum hjá Mathiasi Hermansen og Jógvani Mikkelsen í Tjørnuvík. Eitt danskt skald tekur soleiðis til "og vores navne glemmes, som sne der faldt i fjor". Sálmalinjan hjá Ingemann er nokk betri kend: "ætt eftir ætt søkkur undir mold". Kortini um so er, er tað áhugavert, at vita nakað um sínar forfedrar og ætt teirra.

Mikkjal, bróður Kristionnu, sum var nevndur Mikkjal har Frammi, bleiv verandi tjørnuvíkingur. Kona hansara Malan var ættað av Miðgerði í Kollafirði. Tey áttu nógv børn, 3 synir, Hans, Sámal Petur og Jóannes. 2 døtur giftust og vórðu verandi har norðuri, meðan Jógvan og Joen Hendrik komu til Havnar og búsettust har.

Hermann, bróður Dáva, giftist og búsettist eisini í Tjørnuvík, men systrarnar fluttu hagani. Tann elsta, Elin, giftist til Selatraðar. Birita og Anna Malena til Haldórsvíkar, meðan tann yngsta, Súsanna, gjørdist bóndakona við Svartá í Saksun. Maður hennara var nevndur Jóannis við Svartá.





*Her síggja vit Jørgen og Cathrine Sofie. Jørgen átti onga jørð og var tí óynsktur sum versonur. Men Jørgen var ikki ráðaleysur. Hann róði av Nesi norður til Viðareiðis og snøgt sagt burturflutti gentuna. Og væl kom burtur úr. Tey fingu 11 børn og teirra eftirkomarar teljast í dag í hundraðtali.*

### "Tramin, Per og Prytz"

Í sambandi við umrøðuna um Hermann, sum seinri varð nevndur gamli Hermann, av tí at hann átti tveir abbasynir við sama navni, skal eg siga frá nøkrum søguligum hugleiðingum um Tjørnuvíkar kirkju.



*Eitt barnabarn hjá teimum báðum er Hjørdis Háberg, sum fyllir 87 ár í dag. Her situr hon á teirri kistuni, sum omman hevði við sær, tá hon kom á Nes í 1862. Kistan stavar annars frá Blankaskála, hagani ættin hjá ommuni kemur, og hon er gjørd í 1862. Vit ynskja Hjørdis tillukku við degnum.*

Í Tjørnuvík var gomul kirkja bygd og sóknin var tá nevnd "Tjørnevig Sogn", og Hermann hevði í nógv ár verið deknur. Søgan sigur, at talan hevði verið um, at tá ið Haldórsvíkar kirkja var liðug, skuldi kirkjan verða flutt til Saksunar, men tjørnuvíkingar vistu ikki betur, enn at henda ætlanin var uppgivin, tí Haldórsvíkar kirkja var liðug og vígd 2. sunnudag í advent 1856, og ikki fyrr enn á heysti 1857 varð kirkjan tikin niður og flutt.

Mær er sagt frá, at henda dapra morgun, tá ið avbygdamenninir komu til bygdina og hetta hendi, fór Hermann fram um veggin, og tá hann sá tað fyrsta flagið verða grivið, tók hann húgvuna av høvdinum foldaði hendurnar um hana og græt.

Tað sigst, at ein maður hagani einaferð varð spurdur, hví kirkjan varð flutt, tá skuldi hann svara so ramliga, at "tað viti teir: Tramin, Per og Prytz." At Tramin var oddamaðurin ivist eg ikki í, men við hinum er meira ivingarsamt. Per í Nesinum var handverksmaður, so hann gjørdi væl bert tað, hann var biðin at gera.

Tað skerst ikki burtur, at Prytz prestur legði grundarsteinin til Haldórsvíkar kirkju, sum varð bygd í sama stíl sum Frederiksberg kirkja, hagani Pryts var ættaður. Men tá ið kirkjan í Tjørnuvík varð niðurtikin, hevði Prytz verið á Nesi í 2 ár. Teir, ið tá høvdu ábyrgdina og máttu geva sítt viðmæli, máttu væl vera sóknarpresturin fyri Norðstreymoy V.U. Hammershaimb og táverandi Føroya próstur Andreas Djurhuus tann yngri.

Søgan sigur víðari, at kirkjufólkið samlaðis kortini hvønn sunnudag til felagslestur í heiminum hjá Hermanni, og tá ið hann var vorðin gamal og ikki sá longur at lesa, tók Óli Jacob Magnussen eftir hann og bjóðaði bygdarfólkinum yvir til sín, og har var felagslestur lisin hvønn sunnudag, inntil skúlin varð bygdur um ár 1900. Torn og klokka varð sett á skúlan, og hann var nýttur til deknagudstænastu til nýggj kirkja varð vígd í oktober 1937.

Dávid Emil Magnussen, sonur Óla Jacob, sum doyði í 1958, hevði tá verið deknur í umleið 58 ár. So leingi hann livdi varð Kingobók nýtt við hvørju deknagudstænastu, men tá ið prestur var, varð sungið úr sálmabók for "Kirke og Hjem".

### Søgan verður flutt út á Nes

Nú skulu vit flyta orð søgunar úr Tjørnuvík út á Nes.

Á vári 1817 var nýggjur danskur sóknarprestur útnevndur fyri Eysturoynna, Kristian Ludvig Homann. Hann kom á Nes sjálvur triði, prestafrúan Johanna Margretha, fødd Kaas og dóttir hennara. Hon hevði verið gift fyrr og átti hesa gentu. Homann prestur var fyri tungari lagnu. Fyrst doyði fosturdótturin 12 ára gomul. Á grøv hennara løgdu tey vakran gravstein, og í august 1822 doyði frúan í barsilssong. Eftir sat hesin sorgarbundni prestur langt frá sínum næstringum við trimum smádreingum, tann elsti bert á 5. ári.

Homann kom tá í samband við táverandi kvívíksprest Niels Lassen Holm, sum lovaði at hjálpa honum við at fáa góða hjálp á prestagarðin. Kristianna, sum tá tænti á Kirkjuteig

*Framhald á næstu síðu*

og Dávur vóru trúlovaði. Hann spurdi um tey vildu fara út á Nes, og hann fekk játtandi svar.

Kristianna, ið var 25, og Dávur, 29 ára gamal, vórðu vígd í Kvívíkar kirkju 31. oktober 1822. At tey skjótt aftaná giftuna eru komin út á Nes, vísir kirkjubókin. 14. november árið eftir fingu tey teirra fyrsta barn ein son, ið varð heimadoyptur og fekk navnið Mathias, men doyði sama dag.

Aftaná at frúan var deyð, gjørdist Homann prestur rættuliga sjúkur, og tað endaði við, at hann bleiv svakur. Foreldur hansara, ið vóru prestafólk á Sælandi, sendu boð eftir honum. Hann fór so niður og hevði synirnar við sær. Hann doyði longu í 1825.

Næsti prestur var Jørgin Gad. Hann kom á Nes sama árið, sum Homann doyði. Meðan Gad var á Nesi bygdi Dávur sær hús uppi á Gørðum. Hann fekk eitt stykki innangarðs av Nesgarði, ið nevnist Illihjalli. Tað var so stórt, at hann kundi føða kúnna av tí, men samtíðis hevur Dávur óivað arbeitt á garðinum, tí tá børnini vórðu doypt, nevnist hann í kirkjubókini sum “opsidder”.

Dávur og Kristianna fingu 7 døtrar, og ikki fyrrenn í 1841 fingu tey næsta sonin. Hann fekk navnið Jørgin, uppkallaður eftir fyrrverandi prestinum.



*Gomlu húsini uppi á Gørðum á Nesi. Her bygdu Dávur og Kristianna úr Tjørnuvík og aldu upp mong børnini.*

At Dávur var knappur og skjótt hugsandi prógvar ein frásøgn. Próstur bað hann fáa sær eitt bræv til kvívíksprest. Hann fór einsamallur við bát til Kollafjarðar. Brævið hevði hann í hettuni, og hana legði hann á bekkin. Hann sigldi norð eftir Tangafirði, komin norð á opnan Kollafjørð, kom ein meldurglaða í seglið, og báturin kollsigldi. Hann treiv eftir hettuni og slapp á kjøl. Kollfirðingar, ið sóu tilburðin, komu til og reddaðu hann, og brævið kom sostatt í øllum góðum til Kvívíkar.

## Vaks upp á Gørðum

Jørgin vaks upp uppi á Gørðum saman við sínum 7 systrum, men tá hann var 14 ára gamal, doyði pápin bert 51 ára gamal. Jørgin mátti so sum hálvvaksin drongur taka við sum húsfaðir.

Tá vóru tær eldru systrarnar giftar. Tann elsta, Thea Malena, giftist við Jákupi á Selatrað. Tey høvdu fá ár saman, hon doyði og Jákup giftist aftur við syskinabarni hennara, dóttur Elsu fastur. Tann næstelsta giftist til Kvívíkar. Hon æt Frederikka, synir hennara vóru Jason og Martin, ið búsettust í Leynum. Tann triðja var Petronella. Hon tænti í nógv ár í prestagarðinum á Nesi. Har var samtíðis Jóannes Heinesen úr Sjúrðastovu á Toftum húskokkur. Tey vóru vorðin trúlovaði og tá Otto Jørgensen próvstur í 1854 flutti til annað embætið í Danmark, giftust tey og vórðu búgvandi í prestagarðinum “náðisárið” út. Tað vil siga, tann flutti presturin átti inntøkurnar av garðinum tað heysti, og teimum skuldu tey taka sær av.

Árið eftir kom prestur aftur á Nes, nevniliga Prytz prestur úr Kvívík. Tá fluttu Jóannes og Petronella inn til Toftir, har tey høvdu bygt sær nýggj hús á Hoygarðinum. Sjúrðastovan var tá niðurtikin, og hitt gamla staðar- og húsanavnið á Toftum hvarv. - Tríggjar tær næstu systrar Jørgins giftust og búsettust norðuri á Kallsoynni. Anna Sofía giftist við Ólavi bónda á Syðradali, Jóhanna og Elin Sofía búsettust á Húsum. Maður Jóhonnu æt Jacob. Jóhanna fekk eina dóttur, hon nevndinst - minnist eg rætt - Gina. Jóhanna doyði ung, og Jákup giftist uppaftur og fekk tvær døtur í seinnu giftuni. Tær giftust báðar við Rasmus Jacobsen, bónda á Glyvrum. Gina, ið var ógift, endaði eisini sínar dagar har úti hjá systrini. Maður Elin Sofíu var Magnus. Eftirkomarar teirra eru bæði á Húsum og í Mikladali. Magnus bóndi í Mikladali, pápi Líggjas og Eivind, var ommusonur Elinu Sofíu. Tann yngsta systurin var Inga, hon giftist við tí tá vælkenda træsmiðinum Peder Jacobsen, Per inni á Gerð í Søldarfirði. Inga lærdi til ljósmóður og var ljósmóður í Nes og Sjóvar sókn í mong ár.

## Hetja sum 17 ára gamal

Sum 17 ára gamal drongur var Jørgin við á einari vandaferð eftir lækna suðuri í Havn. Dóttir Prytz prest var vorðin sjúk, og menn vóru bidnir at fara eftir lækna. Veðurlíkindini



*Her sæst Jørgen saman við seks av sínum synum.*

hava óivað ikki verið góð henda morgunin 26. september 1857, men stórur bátur mannaður við 8 monnum fór av Neshamri til Havnar. Læknan fingu teir í øllum góðum í bátin, men á heimferðini umkomust teir. Olevina, ættað úr Niðristovu á Toftum, ið tá var hálvvaksin genta var stødd úti í Forna, sá tilburðin. Ov lítið av fólki var heima eftir á Nesi, og tá máttu boð verða send til Toftir, og tá ið toftamenn koma á staðið vóru bara 3 eftir á kjøl og vórðu reddaðir. Læknin Petersen, Justinus úti á Rætt og Jørgin. Mær er sagt frá, at fyrstu ferð komu allir 7 á kjøl uttan róðursmaðurin, men aðru ferð báturin fór undir, vóru bara hesir 3 eftir, og Jørgin, ið dugdi væl at svimja, hjálpti hinum báðum. Teir 6, ið sjólótust vóru brøðurnir úti í Forna Jógvan og Hans Jacob, pápabeiggi teirra Andreas uppi í Forna og Kristian Benadiktus úr Gerðinum, allir av Nesi. Síðani var Hans Jacob Høgnesen av Skála, mamman Malena, ið var ættað úr Forna, og hann var staddur har úti. Hin sætti var Danial Niclassen úr Sumba, ið ætlaði sær at verða nesmaður. Hann var trúlovaður við Hansinu úti í Forna og hevði lagt sær gerði inn úti á Líðarenda.

## Burturflutti gentuna

Jørgin hevði, sum áður sagt, tríggjar systrar norðuri á Kallsoynni og hagani fann hann sær eisini gentu. Ein bóndadóttur av Syðradali. Tað sigst, at faðir hennara dámdi einki trúlovilsi. Tá ið tíðini var stórur stættarmunur, og hann var væl hildin at vera ov fátækur at giftast við bóndadóttur, men kærleikin teirra millum sigraði. Hann førdi gentu sína út á Nes, og tey bæði Kathrina Sofía Joensdatter og Jørgin Davidsen vóru vígd í Nes kirkju 22. juli 1862. Hann 21 ára gamal og hon 22 ára gomul. Jørgin var svágur til Hanus á Heyggi á Húsum, og hann var vist vælhavandi, og serliga, tá ið hann hevði fingið “gott blóð”, skuldi hann reypa av sínum ríkidømi. Í einari grindaferð norðuri í Vági sita báðir svágrarnir í køkinum hjá Ólavi í Gerðum. Hanus var í allar ríkasta lagi, Jørgin sat líkasum og hálvsvav á bríkini, hann reistist knappliga rætti hondina yvir til Hanusar og segði: “Vælsignaður svágur, læt meg fáa uppí nevan”. Tá skuldi Hanus tagna. Kathrina Sofía og Jørgin búðu uppi á Gørðum alla ævu sína og fingu ein stóran barnaflokk, 8 synir og 3 døtur. Jørgin var óivað ein góður sonur, maður og faðir. Eg veit, og kann siga fyri vist, at tey 5 systirbørn hansara í Hoygarðinum elskaðu hann sum morbróður og - ikki er ov nógv sagt - sum fosturfaðir eftir tað, at tey gjørdust faðirleys 30. apríl 1870. Henda morgun vóru nógvir bátar á útróðri. Knappliga gjørdist stormur av landnyrðingi við kavaroki. Fimm bátar - er mær sagt frá - komu ikki aftur hendan dagin. Harímillum 2 bátar við Gjógv við 15 monnum. Við Túnabátinum á Toftum vóru 5 mans: yngri Hanus og bróður hansara Tummas í Túni, Jóannis í





*Ein sonur var Jógvan, seinni Næsaa, hovmeistari á “Smirli”. Hann var pápi Hjørdis. Jógvan giftist við Elisabeth úr Sumbæ. Hon var mostir til m.o. tann kenda skiparan á "Vesturhavið Blíða" Jákup Andreas Vang, sum hevur verið nógv umrøddur her í blaðnum.*

Framhald á síðu 17


Greið tínar
tryggingar heima
FØROYAR
Sethús
Stødd á húsum
130
m2
Fleiri hæddir
3
Sjálvsábyrgd
1066
>> Rokna
· Rokna tryggingargjaldið út
· Tekna trygging
· Síggj tínar tryggingar
· Boða frá skaða
www.trygging.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari

# Á vitjan hjá canadisk




Í samband við ferðina til Sitka varð eisini avrátt at fara at vitja skyldmannin, Anfinn Mikkelsen, og konu hansara, Jytte, í Kitimat norðuri ímóti markinum til Alaska. Vit hava umrøtt tey bæði fyrr her í blaðnum, eins og vit hava eina aðra grein um hann aðrastaðni í blaðnum.

Kitimat liggur nakrar hundrað kilometrar sunnanfyri Sitka, so tað skuldi ligið væl fyri at farið framvið. Heilt so einfalt var tað tó ikki. Hevði tað ligið væl fyri, kundi verið farið við ferju 18 tímar til Prince Rupert, og so tveir tímar við bili til Kitimat. Men hetta lá tó ikki fyri, og var eitt at gera, og tað var at flúgva suður til Seattle og síðani norður aftur til Kitimat. At skulu steðga á í Seattle kom nú væl við, tí hetta gav høvi til at vitja Eyðfinn Tausen og virki hansara, sum umrøtt í seinasta blað.

Hetta gav so høvi til at vitja Annfinn frá hóskvøldi og til leygardag á middegi.

Tað var ikki nógv tíð, men Anfinn hevði lagt eina skrá, so mest møguligt kundi fáast burturúr.

Fríggjadagin skuldu vit allan nýta til at vitja í Prince Rupert. Her skuldi so fiskimannafelagið í Prince Rupert vitjast. Sum áður greitt frá, liggur býurin norðantil heilt tætt við markið til Alaska. Her høvdu vit annars allan dagin fyri okkum, tí Jón, sonur Annfinn og Jytte, skuldi koma hagar við flogfari á kvøldi, og hann skuldi koma heim aftur saman við okkum.

Fyrst er at siga, at Prince Rupert er ein sera hugnaligur býur - á stødd við Havnina ella nakað minni. Her var nógv at síggja og eisini nógv, sum hevði við fisk at gera.

## Vitjan á fiskimannafelagnum

Vit skuldi vitja United



Hesin báturin hevur eina sjáldsama søgu. Ein fiskimaður í Japan fer til útróðrar og kemur ikki aftur. Mánaðar seinni rekur báturin á land í Prince Rupert. Og so løgið var tað, at báturin var úr japanska vinarbýnum hjá Prince Rupert. Nú verður báturin sýndur ferðafólki.




Her síggja vit hvar Prince Rupert er.

# kum fiskimannafelag



*Her verður púra feskur laksur koyrdur við flutningsbandi í ein lastbil, sum koyrir hann á fiskamjølsverksmiðjuni. Virkisleiðaranum dámdi einki at myndir vórðu tiknar av hesum parti av framleiðsluni. Tað er lætt at skilja.*

Fishermen and Allied Workers Union, stuttnevnt UFAWU, sum eisini umboðar arbeiðsfólk á flakavirkjum. Í Fishermen's Hall hittu við Des Nobles, sum var sera tíðindafróður, og sum kundi greiða væl og virðiligа frá fiskivinnuviðuskiftum sovæl á staðnum sum í Canada yvirhøvur.

Fyrst og fremst fingu vit greitt eina misskiljing. Vit á okkara leiðum halda kanska, at meðan tað er “wild-west” í fiskivinnuumsitingini í USA, so eru skipaði viðurskifti nærum eftir norðurlendskum viðurskiftum í Canada. Veruleikin er tann beint mótsatti samb. Des.

## Selja fiskirættindi fyri bilverksmiðjur

Fremsti munurin er tann, at meðan fiskivinnan í t.d. Alaska verður fyriskipað í statinum sjálvum, og harvið nær við “brúkaran”, sum tað eitur, so er tað meginfyrisitingin í Canada, sum hevur fiskivinnuna undir hond. Hendan umsiting liggur langt inni í landinum. Hon hevur ikki ta minstu føling við fiskimonnum, sum annars heldur ikki telja so nógv í atkvøðum, at tað hevur hevur týdning at lurta so nógv eftir teimum.

Hetta merkir t.d., at canadiska stjórnin kann avreiða fiskirættindi til japanarar afturfyri, at hesir t.d. seta eina bilverksmiðju á stovn onkra heilt aðrastaðni, og har tað kanska eru fleiri atkvøður at heinta.

Úrslitið er eisini hareftir, og hetta sæst ikki minst á vesturstrondini. Tað er kanska frægari eystanfyri, nú teir hóast alt hava eina rúgva av rækjum.

## Kreppa tá fiskurin svíkir

Ítøkiliga er Prince Ruper ímyndin av gongdini í fiskiskapinum. Hetta sæst ikki minst í sjálvum fólkatalinum. Fyri bert nøkrum fáum árum síðan búðu 15.000 fólk í býnum. Des sigur, at teir tora ikki at telja, men mett verður, at fólkatalið í dag er um 12-14.000. Her er hent tað sama sum í Føroyum, tá fiskurin svíkir, nevniliga at fólk flyta.

Eitt er møgulig kreppa í fiskastovninum. Men tað bøtir ikki um, at tað tykist, sum at fiskiveiða í Canada er stýrd av skrivi-borðsgeneralum, sum annars ikki hava kenslu við veruliga lívið. Besta dømið um hetta eru tær reglur, sum vórðu gjørdar, tá toskaveiðan minkaði niður i einki - serliga við New Foundland. Tá gjørdist tað revsivert at veiða til egna nýtslu. Tað er greitt, at eitt slíkt forboð bjargar onkum stovni. Afturat hesum er tað, at slíkar reglur kunnu ikki handhevast.

Annars sigur Des, at tað eru somu reglur á hansara leiðum. Men sportsfiskarar hava nógva makt. Tað kann verða skoytt uppí, at júst Prince Rupert verður marknaðarførdur sum eitt paradís hjá stuttleikafiskarum. Hesir hava stór feløg við nógvum limum, sum hava ávirkan. So Des kundi keypt sær eitt sportsfiskaraloyvi og harvið lógliga kunnað fiskað eitt kók. Men tað kundi hann ikki droymt um. So hann “stjelur” við góðari samvitsku tað, hann hevur brúk fyri av “forbodnari frukt”.

Sum vit nevndu í seinasta blaði, so hava tey júst í Alaska eina skilagóða skipan. Her er loyvt at veiða til egna nýtslu eftir nærri ásettum reglum.

## Inuittar hava forrættindini

Tað skal nevnast, at ein stórur partur av fólkinum í Prince Rupert eru tað, teir kalla við einum vøkrum heiti “First Nation People”. Hesi hava ymisk forrættindi fram um tey “hvítu”. Tey kunnu fiska til egna nýtslu. At munur er á rættindinum hjá borgarunum, kann skapa tvístøðu.

## Vinnan verður dripin av umsiting

Des sigur, at í fiskivinnuumsitingini hava teir fyrst beint fyri teimum smáu bátunum og síðani fyri teimum stóru. Tað verða slíkar byrðar lagdar á fiskivinnuna, at hon hórar ikki undan. Vinnan skal gjalda allar útreiðslur sum t.d. av eftirliti o.l., sum vit á okkara leiðum rokna sum eina sjálvfyglgju, at tað almenna skal gjalda. Og tess fleiri, ið fara úr vinnuni, tess færri eru at gjalda, so her er talan um eina ónda ringrás.

Des hevði einaferð fingið tað hugskot, at nú skuldi kann fara at veiða skøtu. Skøta var ikki kvoterað, so her skuldi ikki verið neyðugt við nøkrum roksi. Men hann fekk skjótt annað at síggja. Hann kom inn í umsitingarligu mylluna og fekk m.a. álagt, at hann skuldi hava eygleiðara, sum hann sjálvur skuldi gjalda. T.v.s. á bátinum var ein sum veiddi, og ein sum ansaði eftir honum! Tað var skjótt, at hann kom eftir, at hetta var undirskot og einki annað, og tí var eins gott at gevast beinanvegin.

## Fínasti laksur fer til fiskamjøl

Hvussu galið tað var við fiskivinnuni, fingu vit eisini varhuga av, tá vit fóru at ganga ein túr á bryggjuni. Her høvdu áður verið 8 stór flaka- og konservesvirki. Nú var bert eitt stórt eftir og so tvey smærri. Og framleiðslan á tí stóra virkinum var laksur, sum varð innfluttur til Alaska, tí eingin laskur fekst frá egnum bátum vegna manglandi veiðirættindi. Og tað var sama farvatn!

Og so tá tað sæst, hvat teir gjørdu við laksin! Rognini vórðu tikin og útflutt til Japan, men sjálvur



*Annfinn t.v. og Des Nobels. Báðir hava verið fiskimenn men undir sera ymiskum umstøðum.*

*Tveir fiskimenn hava fingið ókeypis laks til agn. Laksurin hevði kortini farið til mjølframleiðslu!*



*Framhald á næstu síðu*

Framhald av undanfarnu síðu



*Ráðhúsið í Prince Rupert við einum indianskum totempela.*

fiskurin fór til mjølframleiðslu! Tað var ikki so løgið, at virkisleiðarin ikki ynskti, at vit skuldu taka myndir av hesum “svínaríi”.

Annars er tað stórt sæð bert summararbeiði á virkinum. Beint nú arbeiddu eini 200 fólk har. Men á vetri eru tey bert 17. Fyrr arbeiddu 200 fólk í trískiftisvakt alt árið.

### Svíkjandi grundarlag fyri arbeiðsloysisstuðli

Trupulleikin hjá fiskimonnum er eisini arbeiðsloysisstuðulin. Hesin er í Canada treytaður av, at viðkomandi hevur verið so og so leingi á arbeiðsmarknaðinum. Men tess minni arbeiði er, tess minni er grundarlagið fyri arbeiðsloysisstuðli. Tað sigur nakað, at meðan tað fyrr var vanligt hjá fiskimanni at kunna fiska 8 mánaðar, so er nú talan um 6 vikur.

Tá so ein missir grundarlagið fyri at koma inn í tað lokala ALS, er bert almannahjálp eftir, og hetta er í hvussu er ikki tað stóra.

Tað eru sjálvsagt hugskot um, hvussu fólk skulu fáast í arbeiði aftur. Eitt hugskot er at hava eina lága “lærutímaløn” fyri fyrsta tíðarskeiðið á einum virki. Hetta kann kanska ljóða gott. Men vandin kann skjótt gerast, at tá hetta tíðarskeið er liðugt, fær hann sekkin, og skal so aftur byrja hjá einum nýggjum arbeiðsgevara fyri ta lægru tímalønina.

Fyri at loysa arbeiðsloysistrupulleikan verður nú arbeitt við at byrja boring eftir olju. Men sum Des sigur, so má hetta í hvussu er gerast við skili og skal ikki verða stýrt uttanífrá.

### Inntøkur frá fiskivinnuni farnar niður í ein fjórðing

Hvussu nógv fiskivinnan er fallin sæst annars eisini av, at inntøkan frá fiskiskapi í Prince Rupert er seinnu árini fallin frá 300 mill. canandiskum dollarar til 80, ella nærum til ein fjórðing. Hetta sæst aftur í øllum samfelagnum. Des sigur, at einaferð var býurin tann ríkasti á leiðini, men her er nógv broytt.

Annars umboðar felagið UFAWU umleið 1.500 fiskimenn, og er hetta fyri alla vesturstrondina á Canada. Tilsamans eru 6.000 limir í felagnum, so restin er arbeiðsfólk á flakavirkjum. Einir 300 fiskimenn í Prince Rupert eru limir. Tann størsta fiskivinnuhavnin er í Vancouver. Fiskivinnuhavn er eisini í Victoria, sum liggur á Vancouver Island. Hetta ljóðar ikki av nógvum fiskimonnum eitt so langt strekki. Tað eru heldur ikki allir, sum eru limir. Mett verður, at bert 1/3 av fiskimonnum eru við í felagnum, og hetta avmarkar sjálvsagt styrkina hjá fiskimonnum. Tað skal sigast, at summir av “first nation” fólkinum, eru limir í serstøkum “brotherhoods”.

Her kann skoytast uppí, at felagið er stovnað í 1945 við samanlegging av tveimum feløgum, sum vóru frammanundan. Felagið gevur út eitt mánaðarblað “The Fisherman”.

Lagt kann verða afturat, at fiskimenn á hesum leiðum í Canada, rokna aldan laks fyri at vera eina hóttan ímóti teirra egna tilverugrundarlagi, sum jú er villur laksur. Millum tilfarið, vit fingu, var eisini ein faldari við tí boðskapi, at aldur laksur var vandamikil fyri heilsuna við øllum tí, sum verður koyrt í hann av heilivági og øðrum. Teir hava í hvussu er rætt í tí, at aldi laksurin er ein hóttan móti teimum prísum, teir annars vildu fingið.

Annars er Des eisini listamaður. Hann býr saman við konu síni í eini lítlari bygd við 40 fólkum á eini lítlari oyggj. Hann hevur bát og siglir til arbeiðis hvønn dag.

Tað var stuttligt at hitta Des. Vit fingu eina góða hylling av einum fiskivinnusamfelag sum er so fjarskotið, at tey flestu okkara ikki hava hoyrt um tað áður.

Væntandi frætta vit meira sum frá líður.



*Ein fiskivinnubýur sum Prince Rupert hevur mist nógv fólk á sjónum. Hetta er minnisvarði yvir hesi.*




*Fiskimannafelagið á leiðini ger vart við seg.*

## Felagsformansval

**Í ár er felagsformansval í Føroya Fiskimannafelag. Um uppstilling og val sigur lóg felagsins:**

*Við vali av felags- og sýsluformonnum hevur hvør sókn rætt til at stilla upp ein mann. Við vali av felagsformanni hava eisini limirnir á teimum skipum, sum eru burtur, tá uppstillingin fer fram, rætt til at stilla upp ein mann. Maður er uppstillaður sum felagsformansevni, um 5 sóknir/skipsmanningar skjóta hann upp.*

*Valini eru loynilig og fara fram eftir reglum, sum felagsstjórnin ásetur. Skipast skal so fyri, at limir, sum eru burtur, meðan valið fer fram, skulu hava høvi til at greiða atkvøðu.*

*Atkvøðuseðlarnir verða sendir grannskoðara felagsins, sum telur atkvøðurnar upp.*

*Allir formenn verða valdir fyri trý ár í senn, og tekur valskeiðið við 1. februar.*

Felagsstjórnin hevur annars ásett hesar reglur fyri val:

*Viðvíkjandi uppstilling:*

a. Boð um uppstilling verða send sóknum og skipum fyrst í november. Fráboðanin fer eisini fram í FF-blaðnum.

b. Seinasta freist at boða frá uppstilling er 4. desember kl. 16, og skal uppstillingin vera váttað av sóknarformanni ella álitismanni hjá manningini.

c. *Viðvíkjandi vali:*
   a. Valrætt hava teir fiskimenn, sum hava goldið limagjald fyri 2002/2003, ella sum í 2003 eru mynstraðir og verða avroknaðir eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, tó skiparin undantikin.
   b. Felagsskrivstovan sendir áðrenn valið sóknarformonnum yvirlit yvir fiskimenn við atkvøðurætti.
   c. Á atkvøðuseðlinum verða prentað nøvnini á valevnum. Hesin skal koyrast í ein brævbjálva. Aftanfyri skal skrivast navn, bústaður, føðingardagur og seinasta skip og tíðarskeið, viðkomandi hevur verið við. Brævbjálvin skal sendast beinleiðis til grannskoðara felagsins.
   d. Sóknarformenninir skipa fyri valinum, soleiðis at teir býta atkvøðu- seðlarnar út til limirnar og so vítt gjørligt heinta teir. Í sóknum, har tað av praktiskum ella øðrum orsøkum ikki ber til at nýta hesa mannagongd, verða atkvøðuseðlarnir sendir beinleiðis til limirnar við postinum. Hesir senda teir beinleiðis aftur til grannskoðara felagsins.
   e. Har sóknarformenninir skipa fyri valinum verður samsýningin kr. 7 pr. fiskimann við atkvøðurætti.
   f. Atkvøðuseðlarnir skulu vera grannskoðara felagsins í hendi í seinasta lagi 30. januar.
   g. Fiskimenn, sum eru burtur, meðan valið fer fram, fáa atkvøðuseðil sendandi umborð.
   h. Mannagongdin við valinum verður lýst í bløðunum.

Føroya Fiskimannafelag

Tøðu, Niklas á Kvíggjarbeygi og Jóannes í Heygarðinum, allir 5 vóru giftir, og eftir sótu 5 einkjur við faðirleysum børnum. Tummas í Túni var nýliga giftur og dóttur teirra, sum einkjan Julia átti eftir tað, at maðurin var deyður, fekk navnið Thomasina. Hon giftist við Hanus Rubeksen í Smiðjustovu í Havn. Hon gjørdist 90 ára gomul. Fyriuttan at skaffa døgurðamat til hús sítt úti á Gørðum, og um greipa hekk eftir á trænum, so átti systurin á Heygarðinum eisini fisk at metta síni børn við.

### Dømi um skaðadag

Ein annan skaðadag 15 ár seinni skal eg eisini siga frá. Tað var 30. mars 1885, ein toftabátur við 5 monnum umkomst innanvert við Neshamar. Teir komu aftur av útróðri. Tað kann tykjast undarligt at koma inn av havinum og so ganga burtur, tá ið teir vóru komnir inn á deyðavatn. Jóannis á Neystabø úr Vík hevur sagt mær frá veðrinum tann seinrapartin á degnum. Jóannis var ætaður úr Gjógv á Strondum. Hann var við gjáarmonnum á útróðri sama dag. Hann stóð tá í ættini við nakað av vindi, men grimdaregn var. Tá ið Sjóarbáturin kom inn móti Garðsenda, stakk hann vesturum við glaðustroki út av Kaldbaksfirði. Tá kom Toftabáturin heim um Skarðhamar. Báðir bátarnir høvdu fiskað væl. Sjóarmenn fingu skjótt lívd av Raktanga. Toftabáturin fekk eina freka glaðu, tá ið teir komu inn ímóti Heygsbakka. Báturin fyltist og teir umkomust. Jørgin var við hús og stóð í stovuvindeyganum og eygleiddi, tá ið hann fórst. Konan lá á song og hevði nýliga átt yngstu dóttur teirra Elin. Hann fór stillisliga út, segði einki. Aðrir nesmenn vóru á veg til húsar. Teir høvdu eisini verði á útróðri. Nesmenn skutu bát út og komu skjótt til, men ovseint var. Tá sótu bara 2 menn á kjøl. Hinar 3 hevði havið tikið. Janus í Leigustovuni og Hans Andrias í Hoygarðinum vórðu reddaðir. Óla Jákup niðri í Húsi, ið var 61 ár, Dávur í Hoygarðinum, ið var 17 ár og Tummas úti á Heygum, ið var 12 ár druknaðu. Dávur slapp eisini væl á kjøl, men tá ið hann sá Óla Jákup flóta við borðið, vildi hann redda hann eisini, tí Dávur var frálíkur svimjari. Brøðurnir ráddi honum frá at fara, tí tað var so óslætt við borðið. Dávur fór kortini, men hetta miseydnaðist. Tá Dávur skuldi taka hann, fekk Óla Jákup um beinið á honum og báðir sukku. Seinasta orðið, Hans Andrias hoyrdi beiggjan siga var: "Óla Jákup slepp mær." Nesbáturin var akkurát ov seinur. Tá ið Jørgin fór inn til systrina við deyðsboðunum segði hann: "Kundi eg ikki náa at redda son tín á lívi, skal eg royna at fáa tær líkið." Tá ið veðrið hasaði av, fóru teir at leita. Fyrstu ferð teir ringdu línuna niður, fingu teir Óla Jákup og Dáva hvør á sínum ongli. Seinri funnu teir eisini Tummas. Teir vóru allir tríggir grivnir í eini felagsgrøv á Nes kirkjugarði.

Annan mai stendur henda tøkk í "Dimmalætting":

*Hermed undlader jeg ikke paa egne og medsørgende Families Vegne at medbringe min inderlige Tak, først til Næsmænd, som den skæbnesvangre Dag den 30. Juli med en vidunderlig Snarhed kom os til Hjælp og ved Guds Hjælp reddede, hvad der kunde reddes, da vor Baad var gaaet under udenfor Næshammer. Dernæst takker vi alle dem, der med ufortrøden Flid og Iver ledte efter Ligene og de Gode Personer, som ved den sørgelige Begivenhed blev begravede i Bølgerne, hvilket Foretagende, ved Guds Hjælp, kronedes med Held, at de alle blev fundne.*

*I lige Maade takke vi den store Skare, der med deltagende Hjerte fulgte de afdødes jordiske Levner til deres Hvilested.*

*Gud, som ser i det skjulte, lønne dem alle af Naade aabenbare.*

*Tofte, den 25. April 1885.*

*Paa egne og medsørgende Familiers Vegne*

*H.A.Heinesen*




*Ginn og Anna Sofía, sum druknaðu saman við abbanum Jørgen í 1911. Ginn var ein hetja. Hann doyði í royndini at bjarga abbanum og systrini.*

### Kendur sum skilamaður á sjónum

Jørgin á Nesi, ið hann javnan varð nevndur, var í seinri helvt av 19. øld ein væl kendur maður. Serliga sum dúgligur útróðrarmaður, og var óivað eisini skilamaður á sjónum. Men hann bar orð fyri at leggja nógv fyri, sum mangur føroyingur gjørdi - og farið var bert í bát við árum og segli.

Tá vórðu nesmenn, sum føroyingar flestir, allir við stórum bátum um háveturin og til várróður, men um summarið róðu teir út við smærri bátum. Tá ið várróðurin var fyri, róði Nesbáturin sum oftast norð á hav. Tá ið farið var, og tað viðraði, vóru teir heila viku frá húsum og avreiddu teir fiskin, sum tað best lá fyri. Sum oftast avreiddu teir á Húsum og ofta á Vík. Í hesum bygdum hevði Jørgin nógv skyldfólk og kenningar, sum hann og bátsfelagir hansara kundu støkka inn á gólvið hjá og fáa sær eina hvíld.

Eg skal bert siga frá einum útróðrardegi hjá Nesbátinum, soleiðis sum ein eldri Víkarmaður segði frá. Ein morgun komu teir til Víkar og ætlanin var at fara norð á Hav. Jørgin fór inn á Kýrheyg at fáa teimum upp í kaggan. Húsmóðurin Elin var á fótum. Hon skuldi siga við hann: "Nú systkinabarnið, tit fara ongan veg í morgun, tit eru alt ov seinir á sjóvarfallinum, líkindini eru heldur ikki góð, og okkara menn eru langt síðani farnir".

Sáttligur, sum Jørgin altíð var í orð og talu, segði hann bert: "Vit ætla at rógva norð um Víkarnes og hyggja, hvussu líkindini eru".

Teir fóru so, men illveðursdagur varð. Víkarbátarnir komu aftur í øllum góðum, men teir longdust mikið eftir Nesbátinum, tí hann øtlaði nógv veðrið á landnyrðingi. Nesbáturin var tann síðsti báturin inn gjøgnum Eiðisflógvan tann dagin, og menn undraðust, hvussu fremmandi bátur skuldi koma. Jú teir høvdu bæði sett og fingið línuna afur í bátin í øllum góðum og eisini fingið væl av fiski. So báturin hevði passaliga føru. Fiskin avreiddu teir á Selatrað og so aftur á Nes. Tjørnuvíkingar søgdu frá, at tað hendi meira enn einaferð, at teir sum smádreingir lógu á bátinum, meðan menninir á Nesbátinum vóru við hús og fingu sær mat og drekka.

Um summarið, tá ið róð var við smábáti, og synir hansara vóru komnir so mikið til, at teir kundu koma við á bát, róði Jørgin mest út við teimum. Hvussu langt hann fór bara við 4 synum sínum hevur verið greitt frá í Dimmalætting í apríl mánað í 1960, tá ið Jóannes sonur hansara fylti 90 ár, og Jóhan Højgaard hevði havt eina samrøðu við Jóannes.

Har segði hann frá einum útróðrardegi. Teir settu línuna suðuri undir Stóru Dímun. Meðan línan stóð, løgdu teir at landi. Dánial og Dávur, sum tá vóru á 14. og 12. ári, fóru niðan á oynna at síggja seg um, meðan Ólavur og Jóannes, sum vóru yngri, fóru bert niðan á bakkan. Tá ið teir høvdu fingið línuna aftur í bátin, og tað ikki var sjóvað norð um fjørðin, lógu teir nátt í Skúvoy.

At tíðin er nógv broytt tey seinastu 70-80 árini í samferðslu og postsambandi prógvar ein onnur ferð. Jørgin var biðin at fara til Klaksvíkar við einum brævi og hava skrivligt svar aftur við sær. Hann fór við synum sínum við báti norður fyri Bjørg. Teir høvdu snøri við. Komnir norð á Gøtubogar, fóru teir at dyrgja eftir upsa og fiskaðu rættuliga væl. Veiðuna avreiddu teir í Klaksvík, meðan teir bíðaðu eftir svari. Tá ið teir høvdu fingið brævið, fóru teir suðuraftur. Ikki mundi Jørgin halda tað hasta við brævinum, tí hildu teir á suðurferðini út um Larvassagrynnu at fiska, og tá ið vestfallið kom aftur, fóru teir inn til Havnar við brævinum, og avreiddu hesa seinru veiðuna í Havn.

### Stóran barnaflokk

Sum áður sagt, fingu Jørgin og Kathrina Sofía ein stóran barnaflokk. Tey komu øll væl undan og vuksu til. Allir 8 synirnir vórðu dugnaligir sjómenn sum faðirin. Dánjal og Dávur búsettust á Nesi. Dánjal hevði konu úr



*Emil hjá Jørgen við húski. Kona Emil var Davia.*



*Jóannes, sonur Jørgen og Catrinu Sofíu.*

*Framhald á næstu síðu*

Vestmanna, hon æt Lena Haldansen. Dávur giftist inn á Kvíggjarheygg. Kona hansara var Maria Magnussen. Ólavur, Jóannes og Emil settu búgv í Æðuvík. Ólavur hevði konu úr Niðristovu á Toftum, hon æt Daniella Johannesen. Kona Jóannesar var úr Porkeri, Sarina Müller. Hon kom sum ung genta við Evensen, prósti, úr Hvalba inn á Nes. Har var Jóannes húskallur. Tey giftust og fluttu til Æðuvíkar at búgva. Hann var fyrsti maður, ið setti seg niður har. Emil hevði eisini konu av Toftum úr Kvíggjargarðinum, Davia Heinesen. Kristoffur fór sum ungur við eingilskmonnum, og hann varð ein vælkendur trolaraskipari í Grimsby, har hann var búsitandi. Jógvan sigldi nógv ár sum hovmeistari við "Smirli" og var giftur og búði fyrst á Tvøroyri og seinni fluttu tey til Havnar. Jørgen bygdi sær hús á Glyvrum. Hann giftist við dóttur Símun við Stein. Tríggjar vóru døturnar. Jóhanna giftist til Lambar við Jákup á Gerðinum. Tey fingu sær familjunavni Gaardlykke. Jana og Elkin giftust til Rituvíkar. Jana við tí tá vælkenda skiparanum Dánial Peter Højgaard og Elkin giftist við Elias Olsen, ið var - minnist meg rætt - ein undangongumaður tá í tíðini, tá nógvir føroyingar vóru "til lands" í Íslandi.

Mamma gamla Jørgin, sum hann nú varð nevndur, fór inn til dóttrina á Toftum, tá ið hon var vorðin gomul. Hagani doyði hon út 97 ára gomul. Tá hevði hon sitið blind í umleið 20 ár.



*Dánjal, sonur Jørgen, og Malena, kona hansara. Tað vóru teirra børn sum druknaðu saman við abbanum í 1911.*

Vanlukkuligur pálmaleygardagur

Várið 1911 var eitt sera gott vár til veður. Skipini fiskaðu flest øll undir Føroyum og sigldu nógv inn á Skálafjørðin eftir agni. Og nógv vársild var at fáa har. Tá áttu bæði Thomasen á Tvøroyri og Dahlamenninir í Vági íshús við sildagoymslum á Skálafirði. Jørgin røkti eisini sildagørn. Ein morgun høvdu teir fingið rættuliga væl, teir vóru bangnir fyri ikki at sleppa av við hana har á staðnum. Jørgin fór so sjálvur fjórði norð í Kallsoynna. Hann visti, at nú var um bestu útróðrartíð á Norðhavinum og ofta treyt teimum gott agn. Jú í Mikladali sluppu teir av við tær seinastu sildirnar.

Eisini Pálmaleygarnátt høvdu teir gørn standandi og fingu eisini væl av sild, sum teir fóru til Skála við. Joen Karl Kristiansen átti stórt íshús. Áðrenn teir fóru, var avgjørt at farast skuldi til Havnar, tá ið teir komu út aftur. Farið var, men tá var komið nakað út á dagin, men veðrið var gott - eitt lot av únyrðingi. Tey, sum við vóru, var Jørgin, ið tá var 69 ára gamal, 3 abbabørn, børn hjá Dániali og Lenu. Hesi vóru Anna Sofía, 16 ár, Ginn, 12 ár og Óli, 10 ára gamal. So vóru 2 dreingir aftast. Hans Jacob á Gerðinum, ið var 15 og Peter í Hoygarðinum, ið var 14 ár. Ferðin gekst væl suður, men tíðin varð stutt í Havn, tí ov seint var farið. Tað skýmdi væl, áðrenn farið var av Havnini. Vestligur útnyrðingur var ættin, tí róðu teir niðan á Hvítanes fyri at kunna sigla um fjørðin. Teir høvdu so seglið á, men tá ið báturin var komin 1-2 snørislongdir úr landi, kom ein meldurhvirla út av landi, og teir kollsigldu. Hans Jacob og Peter slupp straks á kjøl, men Ginn sum dugdi at svimja sum fiskurin varð við at mala uttan um bátin fyri at leita eftir systrini og abbanum, men tá var vorðið rættiliga myrkt, og tey sóust ikki aftur. Tá Ginn kom aftur til bátin, var hann heilt útlúgvaður. Hvítanesmenn, sum hoyrdu neyðarróp teirra, komu skjótt út til teirra og bjargaðu teimum trimum, men Ginn var so illa farin, at hann doyði. Dreingirnir, ið reddaðir vóru, vórðu væl móttiknir og vóru har náttina yvir.

Pálmasunnudag var nógv fólk komin til kirkju úti á Nesi. Fáur mundi tá hava frætt um vanlukkuna, fyrrenn tey komu í kirkju. Eg, sum tá var á níggjunda ári, var komin eisini. - Nesmenn vóru farnir tíðliga á morgni suður á Hvítanes. Tá ið komið var til kirkjutíð komu teir aftur við teimum trimum, ið reddaðir vóru. Gulak Jacobsen, ið tá var hjálparprestur á Nesi, fór oman á Hamar at taka ímóti teimum, og hann fór síðan niðan á Garðar. Steðgað var at fara í kirkju til prestur kom omanaftur. Tástaðni ringdi kirkjuklokkan, og kirkjufólkið hevði bíðað í tolni. - Tað var ein minnisrík syrgjugudstænasta ið varð hildin í Neskirkju hendan dagin. Undan taluni var bert sálmurin "Sí, hvør nú Jesus frøðir", sungin, og aftaná var sungið "Kom Sandheds Konge. Kristus kom, ind i min Sjæl du drager". Hesin sálmur passaði sera væl til dagin, hvar millum annað stendur í triða versið "Kom Livets Fyrste, før min Sag / mod Gravens mørke Hære / er du mig nær,



*Niclas Højgaard, sum lesarar okkara kenna, er eisini ein abbasonur Jørgen.*

skal Dødens Dag / en Palmesøndag være".

Tað varð leitað og rikið bæði seinnapart sunnudagin og teir fylgjandi dagarnar, men líkini vórðu ikki funnin. Nakrar dagar aftaná kom Kristoffur inn við trolara sínum, eisini hann setti trolið nakrar ferð men við sama úrsliti.

Langafríggjadag fór Ginn til gravar. Tað var eitt stórt líkfylgi, sum kom oman av Gørðum og vísti honum, og teimum, teirra seinasta heiður. - Grøvin varð grivin stutt frá kirkjutrappuni. Tá ið kistan varð sídd niður, steig Gullak Jacobsen prestur fram á gravarbakkan og talaði troystarrík orð og minti millum annað á, hvat ið stendur skrivað í Opinberingini: "at Havet også skal afgive sine døde", og prestur endaði við at lýsa Guds signing bæði yvir honum, ið fekk loyvi at hvíla í vígdari jørð, og teimum, sum høvdu fingið teirra vátu grøv útfyri Hvítanesi. - Meðan grøvin var kastað til, ljóðaðu hesi gomlu løg og sálmavers úr Kingosálmabók, sum Havnar Sangfelag har syngur fyri okkum:

*1."Som den gyldne*
*Sol frembryder,*
*gennem den*
*kulsorte Sky,*
*og sin Stråleglans*
*udstøder,*
*saa at Mørk og Mulm*
*maa fly.*
*Saa min Jesus af*
*sin Grav,*
*og det dybe*
*Dødens Hav,*
*opstod æresfuld*
*af Døde,*
*imod Paaskemorgens*
*røde.*

*2. Tak for at den*
*Fødsels Glæde,*
*Tak for dit det*
*Guddoms Ord,*
*Tak for Daabens*
*hellig Værde,*
*Tak for Naaden*
*ved det Bord,*
*Tak for Dødens bedre Ve,*
*Tak for din Opstandelse,*
*Tak for Himlen,*
*du har ...*
*Der skal jeg dig*
*se og finde."*

Tá ið grøvin var kastað til og áðrenn farið var av grøvini, varð sungið, sum siður var, hesi bæði vers:

*1."Nu lader vi dennem*
*sove i Fred.*
*Vi gaar hver hjem*
*til sit Sted*
*og ... og til ...,*
*thi føden kommer*
*og er ej seet.*

*2. Dertil hjælpe os*
*Kristus vor Trøst,*
*som med sit Blod*
*haver os forløst,*
*fra Djævelens Magt*
*og evige Vee,*
Hannem skee Lov,
Pris og Ære."

**Argir, hin 8. apríl 1961**
**Olaf S. Petersen**



*Í miðjuni er Jógvan Næssaa, th. er systirin Jana, mamma m.o. Niclas Højgaard. T.v. er Tofta Hanna, sum vist ikki er í ættini.*



*Her fara teir við áttamannafarinum. Myndina eigur Hjørdis Háberg, og er helst av Nesi. Men vit vildu fegin frætt um nakar kann siga meira um hesa mynd.*

# Lógin um barsilsskipan skal ikki broytast

Tað er viðurkent av teimum flestu, at nýggja barsilsskipanin var eitt stórt framstig. At hon er so snildisliga fíggjað av ALS-gjaldinum, er so ein onnur søk.

Høvuðsinnihaldið í lógini er:

KVINNAN fær barsilspengar upp til 4 vikur undan føðing og 24 vikur aftaná. Av hesum kunnu tær síðstu 10 vikurnar flytast til mannin.

PÁPIN fær samsýning fyri 2 vikur. Hetta merkir, at ein pápi kann fáa barsilsveiting í upp til 12 vikur tilsamans.

GRUNDARLAGIÐ fyri veitingini er inntøkurnar seinastu 12 mánaðirnar, tó hægst kr. 35.000 um mánaðin.

MAÐURIN fær goldið eftir egnari inntøku, eisini um hann yvirtekur vikur frá konuni.

SKIPANINI verður fíggjað við ½% av inntøkuni, helvt um helvt frá arbeiðsgevara og løntakara. Upphæddin verður reelt tikin av verandi inngjaldi til ALS.

Nú er ætlanin at skerja skipanina munandi vegna sparingar á fíggjarlógini.

FF hevur saman við øðrum fakfeløgum verið á fundi við Vinnumálaráðið, og vit hava ført fram hesi sjónarmið:

Eru ímóti tilvildarligum skerjingum

Í fyrsta lagi eru vit harðliga ímóti, at ein slík skal skerjast. Er tað einaferð funnið rímiligt, at skipanin skal vera sum hon er, kann tað bert við sera góðum grundgevingum gerast broytingar til tað verra. Og hesar eru ikki til staðar. Serstakliga tá havt verður í huga, at uppskotnu broytingarnar gera summar samfelagsbólkar enn verri fyri enn aðrar.

Góðkenna ikki, at almennar útreiðslur verða slúsaðar yvir á partarnar á arbeiðsmarknaðinum

Vit vilja eisini seta okkum ímóti, at útreiðslur, sum higartil hava verið ein partur av landskassans sáttmálaskyldum at veita kvinnum barsilsløn, nú skulu "slúsast" yvir á partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Hetta er jú ein partur av orsøkini til, at hetta uppskot um skerjing liggur á borðinum. Tað kann sjálvsagt vera freistandi hjá tí almenna at sleppa sær av við útreiðslur á hendan hátt. Men tað er óneyðugt at siga, at verður fyrsta stig tikið á hesi leið, verður tað skjótt at næsta stig verður tikið. Og tá vendist ikki aftur.

"Pápaskipanin" skal ikki oyðiliggjast

Umframt ta skerjing, sum verður skotin upp, liggur eisini í uppskotinum ein nærum oyðing av tí, sum var tað mest nýskapandi við skipanini, nevniliga skipanin fyri pápar.

Tað kann sjálvsagt vera ein spurningur, um eitt hámark uppá kr. 35.000 er rímiligt. Men at koyra hetta heilt niður á kr. 20.000, ella lítið meira enn helvt, tykist at vera sera lítið skynsamt.

Men tað, sum er heilt oyðileggjandi fyri skipanina, er uppskotið um, at pápar skulu hava dagpenging eftir inntøkuni hjá mammuni, meðan teir higartil hava fingið eftir egnari inntøku.

Tað er óneyðugt at siga, at tá kann henda skipan eins væl vera avtikin. Víst hava vit líkaløn fyri sama arbeiði, men hóast hetta, er ofta stórur munur á ársinntøkini hjá monnum og kvinnum. Við uppskotnu broytingini verða tað nógv færri, sum fara at taka av hesum møguleika.

Skipanin skal vera sum hon er

Vit halda annars ikki, at tað ber til at hava eina skipan, ið skal vera treytað av "náðini" hjá politikkarum, sum vit síggja tað her.

Skipanin eigur at verða umsitin av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, nakað á sama hátt sum ALS. Tá skal hon í hvussu vera "reinsað" fyri útreiðslur, sum annars hoyra tað almenna til. T.v.s., at barsilsløn til alment sett, verður goldin av landskassanum, har hon hoyrir heima. Barsilspeningur fyri sjúkramelding undan føðing, verður goldin av Dagpeningaskipanini.

Tá kann barsilsskipanin verða sett eftir fyritreytum, sum ein kennir frammundan.

Tað eigur saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at verða kannað, um og hvussu ein slík skipan kann verða sett í verk. Meðan hetta arbeiði fer fram, skal skipanin vera sum hon er.

Annars hava vit eitt annað uppskot til broyting í skipanini, sum er grundað á, at fiskimenn og sjómenn hava slíkt arbeiði, at teir hava brúk fyri eini meiri fleksiblari skipan. Fiskimenn halda tað vera ov stirvið, at ikki bæði foreldrini kunnu hava farloyvi í senn - í hvussu er ein part av tíðarskeiðnum. Ein broyting her skuldi ikki havt fíggjarligan týdning og vilja vit mæla til, at ein slík verður framd.

## 57 nýggjar manningar

Í fyrradagin boðaði Vinnuhúsið frá, at almenna fyrisitingin, tvs landsfyrisitingin, var vaksin við 104 størvum pr. ár frá 1998 til 2002, við øðrum orðum í einum fimm ára skeiði. Áhugavert hevði verið at samanborið, hvat hetta svarar til í høvuðsvinnuni.

At tað eru 104 størv sett fyri hvørt árið, svarar hetta áleið, í einum fimm ára tíðarskeiðið, til talið á størvum í seks av størstu flakavirkjum.

Samanbera vit nýggju størvini í fyrisitingini við størv í fiskiflotanum, og býta tey eftir nøkunlunda stødd av veiðuflotanum, síggja vit at, um byrja verður í 1998, so svarar hetta til manning av fimm rækjutrolarum. Í 1999 manning av trimum flakatrolarum. Ár 2000 manning til 16 partrolarar. 2001 manning til sjey stállinuskip (kundi verði sama tal á djúpvatnstrolarum). 2002 heili 26 útróðrarskip av støddini millum 30 og 60 bruttotons. Samanlagt gevur hetta manningar til 57 skip.

| Ár | Manning til |
|---|---|
| 1998 | 5 rækjutrolarar |
| 1999 | 3 flakatrolarar |
| 2000 | 16 partrolarar |
| 2001 | 7 stállínuskip/djúpvatnstrolarar |
| 2002 | 26 útróðrarskip 30-60 tons |

Áhugavert hevði verið at vita, hvussu nógvar mió. talið av omanfyrinevndu skipum høvdu fiska fyri hvørt árið síðani 1998, men tað kann vendast aftur til seinni.

Man kann spyrja seg sjálvan um tænastan til borgaran er betra í tann mun, hesi 520 størv eru sett í fyrisitingini. Tað kann ikki verða nakar ivi, tá man hoyrir niðurstøðunar hjá løgtingsins umboðsmanni, yvir tænasturnar hjá fyrisitingini til borgararnar.

Eitt er at minnast til afturat, at hesi 520 nýggju størvini eru komin áðrenn nøkur yvirtøka er framd, so ein og hvør kann rokna út hvat talið verður um tað eydnast hjá teimum villastu yvirtøkufólkunum at fáa sítt ígjøgnum.

*Henrik Old*

Einkjur og einkjumenn við børnum, ið eru 16 ár og yngri, hava aftur í ár høvi at søkja Einkjugrunn Føroya um fíggjarligan stuðul.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til Føroya Sparikassa, Stjórnarskrivstovan, Tlf. 348 000, Fax 348 400 ella via teldupostadressu: stjornarskrivstovan@sparikassin.fo

Freistin at søkja er 1. desember 2003.

**Einkjugrunnur Føroya**

**Tíðindaskriv:**

## Norðurlendsk ráðstevna um skeljar og skeljadjór

Fyri 3. ferð verður skipað fyri ráðstevnu av hesum slag. Tann fyrsta ráðstevnan var í Strømstad í Svøríki 2001, og næsta ráðstevnan var í Bergen 2002. Tá varð samtykt, at næsta ráðstevnan skuldi vera í Føroyum.

Birgir Enni frá Norðlýsinum og Árni Nicolajsen frá Fiskiransóknarstovuni skipa fyri.

Fríggjadagin 21. november verður hildið til í Müllers Pakkhúsi í Tórshavn.

Leygardagin 22. november verður hildið til í Norðurlandahúsinum

Leygarkvøldið verdur døgurði í Müllers Pakkhús við øllum góðum úr sjónum (Birgir Enni, saman við manning av Norðlýsinum, skipa fyri)

Sunnudagin verður aftur hildið til í Müllers Pakkhúsi.

### Ráðstevnan kemur at snúgva seg um skelja og skeljadjóra vinnuna í Norðurlondum

Umboð úr Føroyum koma at greiða frá um havbotnin og havstreymar kring oyggjarnar; og um planteplankton og hvønn týdning tað hevur fyri aling av kræklingi. Eisini verður greitt frá um øður og krabbaframleiðslu, skeljavirki, og sølu av skeljum og skeljadjórum.

Umboð úr Danmark greiða frá um Dansk Skaldyrs Center, og um menning av kræklingi og ostra (østers).

Íslendingar fara at greiða frá um teirra kræklingaframleiðslu.

Norðmenn fara saman við sviðum, at tosa um krabbar og felags norðurlendskt samstarv um sølu.

Tilmelding til ráðstevnuna er hjá Heidi Davidsen heidid@myril-line.fo telefon 345936

Kostnaður 200,00 kr.

Íroknað er fiskasuppa í Müllers Pakkhúsi fríggjakvøldið 21. november

Drýlur við skelja- og fiskabitum, á middegi leygardag 22. november

Leygarkvøld verður borðhald í Müllers Pakkhúsi við fiski og skeljamati - kostnaður 250,00 kr.

*Vegna fyrireikararnar*

*Birgir Enni* *Árni Nicolajsen.*

## Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Umsóknarbløð til grunnin fáast við at skriva til: **Postboks 2114, FO-165 Argir,** ella at ringja á tlf. 316089 (svarar eftir arbeiðstíð) ella leggja boð á telefonsvararan.

***Umsóknir til hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. desember 2003.***

Hjálpargrunnurin

FF – á sjógvi og á landi
www.fiskimannafelag.fo

## Tíðindi frá Fiskamarknaði Føroya

# Nýggj landingarmiðstøð á Tvøroyri

### Seinni í hesum mánaðinum fer Landingarmiðstøðin á Tvøroyri ella LMT, sum Fiskamarknaðurin eigur part í, at taka ímóti fiski

Higartil hevur tað ikki borið til hjá skipum og bátum, sum hava avreitt á Tvøroyri, at sleppa av við fiskin á annan hátt enn beinleiðis til virkini. Nú er ein nýggjur møguleiki í ljósmála.

Dagurin er ikki ásettur enn, men tað verður seinni í hesum mánaðinum og í síðsta lagið um mánaðarskiftið. Tá verður klárt at taka ímóti fiski í nýggju landingarmiðstøðini á Tvøroyri.

Fiskamarknaður Føroya telist millum partaeigararnar í nýggju landingarmiðstøðini. Samlaði partapeningurin er 3,1 milliónir krónur, og FMF eigur 0,8 milliónir. Tað eru nógvir partaeigarar. Millum hesar eru bæði skip og bátar og fiskakeyparar kring landið.

Landingarmiðstøðin fer at halda til í nýggjum hølum, sum júst eru bygd eystanfyri bygningin hjá Føroya Fiskavirking á Tvøroyri. Víddin á bygninginum er 1300 fermetrar. Hann er 25 metrar breiður og 52 metrar langur.

Leiðari í nýggju Landingarmiðstøðini á Tvøroyri er Marni Olsen. Hann er 40 ára gamalur og ættaður av Tvøroyri. Hann hevur siglt nógv, og í summar var hann liðugur á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, har hann hevur verið undir útbúgving trý tey seinastu árini.



*LMT (Landingarmiðstøðin á Tvøroyri) liggur eystan fyri virkið hjá Fiskavirking.*



*Marner Olsen, t.v. verður leiðari á LMT, her saman við Kára Debes leiðara á Fløguni í Vági.*

Tað hevur leingi verið eitt ynski at fáa landingarmiðstøð á Tvøroyri. Ikki minst hava teir, sum reka skip har á leið, longst eftir eisini at fáa henda møguleikan. Ætlanin er, at virksemið hjá Kassamiðstøðini í Suðuroy skal umsitast av nýggju miðstøðini á Tvøroyri. Hetta fer at lætta mundandi um. Bæði hjá Kassamiðstøðini og hjá teimum, sum brúka kassarnar og nú fáa møguleika at sleppa skjótt av við kassarnar og at fáa fatur á kassum.

Umframt nýggju miðstøðina á Tvøroyri er ein onnur landingarmiðstøð í Suðuroy. Tað er Fløgin í Vági, har tað serliga eru útróðrarbátarnir í Vági og har á leið, sum leggja veiðuna upp. Henda landingarmiðstøðin hevur verið í Vági síðani miðskeiðis í níti árunum. Talan er um sjálvstøðugt felag, og tað er Kári Debess, sum er leiðari.

FMF hevur havt samstarv við miðstøðina í Vági øll árini, og tað verður vónað, at hetta samstarvið fer at halda fram, og at talan verður um samstarv millum miðstøðirnar í Suðuroy. Hetta fer at gagna báðum miðstøðunum og eisini viðskiftafólkunum hjá teimum og harvið eisini FMF. Umframt á Toftum, í Vági og á Tvøroyri hevur FMF sølustøð í Sørvági og í Klaksvík.

At Fiskamarknaðurin er við í nýggja tiltakinum á Tvøroyri kemst av, at FMF væntar at meira fiskur verður at selja á uppboðssøluni. FMF er av tí áskoðan, at allur fiskur best verður umsettur í einum fríðum marknaði, óheft av virkjum, søluskipanum, almennum kunngerðum um tvang, osv. Skip og bátar skulu kunna leggja fiskin upp til landingarmiðstøðina og selja hann har besti prísum fæst fyri fiskin. Uppboðssølan eigur altíð at verða ein av bestu loysnunum til at selja fiskin til besta prís.

Landingarmiðstøðin á Tvøroyri er avgjørt eitt fet rætta vegin.

# Tølini eru alla staðni lægri

### Virðið á tí, sum varð selt umvegis FMF tíggju teir fyrstu mánaðirnar í ár, var 18,7 prosent lægri enn somu mánaðir í fjør, og oktober í ár royndist væl verri enn sami mánaði í fjør



Virksemið hjá Fiskamarknaði Føroya eigur at vera eitt gott barometur fyri, hvussu tað hevur hilnast í veiðu og prísi, tá ið tað ræður um sølu av feskum fiski í Føroyum. Tølini vísa, at tíggju teir fyrstu mánaðirnar í ár hevur tað hilnast verri, enn tað gjørdi í fjør. Tað hevur tað, tá ið tað ræður um tonsatal, miðal kiloprís og harvið eisini samlað søluvirði. Sjálvandi skal havast í huga, at tað í hesum sambandinum verður ikki hugt at, hvussu býtið millum fiskasløgini hevur verið í ár sammett við í fjør, hvussu býtið hevur verið millum útróðrarfisk og fisk frá skipunum, og um skip og bátar lutfalsliga í størri ella minni mun hava selt aðrar vegir enn ígjøgnum FMF enn undanfarna árið. Sammetingin er altso so einføld, sum tað næstan ber til at gera hana, men tað er eingin ivi um, hvør tendensurin er.

Miðal kiloprísurin fyri tað, sum varð avreitt til FMF tíggju teir fyrstu mánaðirnar í fjør, var 12,18 krónur. Í ár var hann 10,70 krónur. Talan er altso um eina príslækking upp á 1,48 krónur ella 12,15%. Nøgdin, sum varð seld umvegis FMF tíggju teir fyrstu mánaðirnar í ár, var eisini lægri, enn hon var somu mánaðir í fjør. Frá januar og til og við oktober í ár vórðu seld 42.857 tons. Somu mánaðir í fjør var nøgdin 46.302 tons. Minkingin var 3.445 tons ella 7,4 %.

Samlaða søluvirðið er minkað við umleið 106 milliónum krónum. Úr 564 milliónum og niður í 458 milliónir. Hetta svarar til eina minking í søluvirði uppá 18,7%.

#### Oktober nógv lakari

Gongdin í oktober í ár var væl lakari enn tann í oktober í fjør. Um gongdin tíggju teir fyrstu mánaðirnar hesi bæði seinastu árini verður sammett við gongdina í oktober í ár, so vóru tølini henda síðsta mánaðin ljótari, sammett við gongdina í oktober í fjør, enn tey vóru, tá ið teir fyrstu tíggju mánaðirnir í ár verða sammettir við tíggju teir fyrstu mánaðirnar í fjør.

Talan er fyrst og fremst um væl minni nøgd í oktober í ár, enn hon var í oktober í fjør. Miðal kiloprísurin var lakari í oktober í ár, enn hann var í sama mánaði í fjør, men munurin var ikki so stórur, sum tá ið tíggju teir fyrstu mánaðirnir í ár verða sammettir við tíggju teir fyrstu mánaðirnar í fjør. Meðan miðal prísfallið teir fyrstu tíggju mánaðirnar í ár var 1,48 krónur ella 12,15 prosent, so var tað í oktober minni enn helmingin av hesum. Miðal prísurin í oktober í 2002 var 12,52 krónur, og í ár var hann 11,78 krónur. Prísfallið var altso 0,74 krónur fyri hvørt kilo, sum varð selt umvegis FMF, ella 5,9 prosent. Hetta er minni enn helvtin av tí prísfallinum, ið sum heild hevur verið tíggju teir fyrstu mánaðirnar í ár.

At oktober í samlaðum søluvirði royndist væl lakari í ár, enn hann gjørdi í fjør, komst fyrst og fremst av nógv minni avreiðing. Í oktober í fjør vórðu seld umvegis FMF 5.631 tons. Í ár vórðu seld 4.302 tons. Munurin var 1.329 tons ella 23,6 prosent.

# Útróðrarfiskurin skal kunna seljast áðrenn hann verður avreiddur

**Tá fiskur verður skildur á Fiskamarknaðinum verður arbeitt við at fjøltáttað skiljingina og at avmarka handfaringina av fiskinum. Tað fer at koma bæði seljarunum og keyparunum til góða, verður roknað við á Fiskamarknaðinum**





*Skal fiskurin pakkast í kassar ella kør? Ein av málsetingunum hjá fmf er, at keyparin skal kunna avgerða, hvussu fiskurin hann hevur keypt skal pakkast.*

Tað verður arbeitt við at fáa ein størri part av fiskinum enn higartil seldan, áðrenn hann kemur á landingarmiðstøðirnar. Hetta er neyðugt, um tað skal bera til at liva betri upp til ynskini hjá keyparunum í sambandi við sølu og levering av fiskinum.

Fiskamarknaður Føroya, FMF, hevur tvey sløg av uppboðssølum. Onnur verður rópt telefonsølan, og og hin verður nevnd gólvsølan. Eitt sindur misvísandi eru hesi hugtøkini. Báðar sølurnar eru yvir telefonina. Gólvuppboðssølan er av tí fiskinum, sum er komin inn á gólvið, áðrenn hann verður seldur, meðan telefonuppboðssølan er av fiski, sum ikki er komin til lands.

Á gólvuppboðssøluni er fiskur, sum er innvigaður og skildur, og tí liggja faktisk tøl til grund fyri hesari søluni. Á telefonuppboðssøluni er tað ein meting um vekt og støddarbýti á fiskinum, sum liggur til grund fyri søluni.

Keypararnir hava ymisk ynski, hvussu teir vilja hava fiskin leveraðan. Summir vilja hava hann í stórum kørum, og aðrir vilja hava hann í smærri kassum. Summir vilja hava fiskin avísaðan í vatni og aðrir vilja ikki hava fiskin í vatn, tá ið tað verður skilt. Um tað skal bera til at liva upp til ymsu ynskini, og um hetta skal lata seg gera uttan óneyðugar eyka útreiðslur, so verður tað neyðugt, at størri partur av fiskinum verður seldur, áðrenn hann kemur á land.

Hjá skipunum er nógv tann størsti parturin av fiskinum seldur - kanska upp ímóti 95 prosntum - áðrenn hann verður landaður. Tað er frá útróðrarbátunum, at fiskurin verður avreiddur og skildur, áðrenn hann verður seldur. Onkra staðni ímillum ein triðing og ein fjórðing av tí, sum verður selt á FMF er útróðrarfiskur. Ætlanin hjá FMF er, at tað innan ov rúma tíð skal verða soleiðis, at størra helvtin av útróðrarfiskinum skal seljast, áðrenn tað verður avreitt.

Hetta vil við øðrum orðum siga, at ætlanin er at fáa útróðrar-bátarnar at selja, áðrenn teir koma til lands. Umsitingarliga er ógvuliga trupult at selja ov smáar nøgdir eftir eini meting um vekt og støddarbýti. Ætlanin er tí í fyrsta umfari, at bátar, sum hava í minsta lagið tvey tons, skulu vera við í nýggju skipanini.

Um tað á henda hátt fer at bera betri til at laga seg eftir ynskjunum hjá keyparunum, so fer tað heilt víst eisini at hava ágóðar við sær fyri seljararnar. Tað vil við øðrum orðum siga, at um allir keyparar meta, at teir fáa bestu tænastu og vøru við at handla á FMF, verður tað tann rættasti marknaðarprísur bátarnir fáa fyri fiskin á uppboðssøluni.

## Krøvini

Summir keyparar vilja hava fiskin í stórum kørum, og summir vilja hava hann leveraðan í smáum køssum. Allir vilja hava hann skildan í so eins og nágreiniligar støddir, sum tað á nakran hátt ber til, og allir vilja hava bestu góðsku.

Teir, ið vilja hava fiskin í stórum kørum, eru teir, sum arbeiða fiskin á virkjunum kring landið. Hjá teimum ber tað nógv og kostnaðarmikið eyka arbeiði við sær, um teir fáa fiskin í smáum kassum, sum skulu tømast, vaskast og fáast avstað aftur. Teir, sum vilja hava fiskin í smáum kassum, og avísaðan uttan vatn eru teir, sum selja feskt av landinum. Higartil hevur tað verið soleiðis, at teir hava pakkað fiskin umaftur í smáar kassar, eftir at hann er avreiddur og skildur í størri kassar. Hetta arbeiðið plaga eitt nú starvsfólk hjá FMF at taka sær av, um tað er møguleiki fyri tí. Tað vil siga, um tíð hevur verið til tað, eftir at landingarnar hava verið fingnar frá hondini.

Góðskan er ikki minst treytað av, at fiskurin ikki verður handfarin ov ofta frá tí, at hann verður landaður, og inntil keyparin fær hann. Tí er málið, at avmarka handfaringina og umskipingina í sambandi við skiljingina. Ætlanin er, at fiskurin í væl minni mun, enn tað higartil hevur verið gjørt, skal hvølvast í onnur kør á keikantinum. Í staðin skal nógv meiri fara úr kørunum, sum útróðrarbátarnir hava, og beinleiðis á skiljibandið. Hetta verður gjørt við at bátarnir fáa onnur kør umborð í býti við tey teir lata inn við fiski.

## Avleiðingarnar

Málið við broyttu arbeiðsgongdini er, at minimera tíðina frá avreiðing til framleiðslu, at handfara fiskin minst møguligt, og at dekka flest møguligu tørvir hjá øllum okkara kundum. Tað kemur viðhvørt fyri, at onkrir keyparar vilja hava fiskin skildan í aðrar støddir ella rættari í fleiri støddir, enn tað, sum vit vanliga kenna til. Hetta skal eisini verða møguligt tá ið fiskurin so at siga verður markaður, áðrenn hann fer ígjøgnum skiljingina.





Hjá teimum, ið selja beinleiðis av landinum, slepst undan eyka handfaran av fiskinum, tá fiskurin kann pakkast beinleiðis frá skiljaranum.

Hjá útróðrarbátunum verður tann broytingin, at teir skulu boða frá til telesøluna við upplýsingum um mettu nøgdina og støddarbýtið. Um umleggingin fer at rigga soleiðis, sum tað verður vónað og roknað við, so verður telefonsøla við útróðrarfiski seinnapartin. Útróðrarbátar sum ætla sær við á hesa søluna skulu boða frá áðrenn kl. 12.00.

Ofta hevur verið tosað um útróðrarfiskin, sum verður avreiddur tíðliga fríggjadag, men tó ikki nóg tíðliga til, at tað hevur verið møguleiki fyri at bjóða hann út á gólvsøluni fyrrapartin. Tí hevur hann staðið inntil fyrrapartin mánadag. Tað hevur ikki verið mett serliga heppið. Nú verður møguleiki fyri, at hesin fiskurin verður seldur á telefonsøluni seinnapart fríggjadag, og tað eigur at koma bæði seljaranum og keyparanum til góða, at teir fáa fatur á fiskinum so skjótt hann er farin gjøgnum skiljuanleggið



*Løgmaður talar á Sjómansheiminum.*



*Tað var eisini fitt av fólki uppi við minnisvarðan.*

# Minningarhaldið í Havn

Sum vant var minningarhald fyri teimum sjólátnu í Havn. Fyrst var samkoma á sjómansheiminum kl. 10. Her talaðu løgmaður og Martin Restorff Jacobsen, prestur. Síðan var farið niðan á minnisvarðan í viðalundini, har løgmaður legði krans, og Martin Dam Jacobsen bað eina bøn.

Um kvøldið var minningargudstænasta í Havnar kirkju, har Meinhard Bjartalíð, prestur, talaði. Aftaná gudstænastuna var boðið á sjómansheimið til ein drekkamunn. Her var væl av fólki.

Her skal verða nevnt, at eitt navn er komið afturat á listan yvir teir, sum eru farnir á sjónum, sum vit høvdu í seinasta blað. Hetta er Jóan Jacob Blástein, Vestmanna, 59 ára gamal, sum doyði umborð á báti sínum "Hvannadali", tann 14. februar 2003.



*Martin Restorff Jacobsen biðjur Faðirvár.*



*Tað vóru nógv fólk við tilknýti til sjógvin møtt á sjómansheiminum.*



*Frá vinstru síggja vit á sjómansheiminum aftaná gudstænastuna í Havnar Kirkju: Rodmund Nielsen, borgmeistara í Runavík, Meinhard Eliassen, nevndarlim í JFK-trol og Kósavirkinum, Herborg Hansen, sum kanska er einasta omman, sum hevur verið til skips við fiskiskipi, nevniliga "Næraberg", og Hanni Hansen, sum er pápi Karl Hansen, sum doyði við Stapanum. So merkiligt kann tað vera. Tað var um eitt hár gjørt, at tvíburðabeiggin hjá Karl ikki fórst á Norðhavinum nakrar mánaðar seinni.*



*Her síggja vit eisini á sjómansheiminum Jógvan Ingvard Olsen saman við konuni Hildibjørg. Í miðjuni Petur Nolsøe, sum nógv kenna frá tíðini hann arbeiddi á sjómansheiminum í Reykjavík.*

# Bjargingarútgerð

*á sjógvi og landi*



*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.*
*Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*

· Bjargingarbátar
· Bjargingarnet
· Yvirlivilsisdraktir
· Flótidraktir
· Bjargingarvestar
· Bjargingarkransar
· Epirbar/neyðsendarar
· Radartranspondarar
· Eldsløkkjarar
· Eldávaringar
· Branddraktir
· Umvælingar
· Eftirlit

**P/F Gummibátatænastan**
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo



# Skal skipið vaskast?

**Tosið fyrst við EYSTUROYAR REINGERÐ**

- Serkunnleiki innan vasking av aptering
- Vasking av maskinrúmi
- Reinsa teppi
- Bona gólv
- Reinsa koyggju og forheng
- Reinsa gamalt bonivoks
- Seyma nýggj forheng
- Útvega máttur, brúsuforheng, voksdúkar v.m.
- Brúsubakkar "Homequeen vinyl"
- Eisini leggja vit nýtt linoleum ella teppi á dúrkið

**Eysturoyar Reingerð**
Postboks 41 · FO-650 Toftir · tlf./fax: 44 89 88
fartlf: 22 53 50 · teldupostur: nch@post.olivant.fo



# MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64



we make fishing more profitable



**Vit framleiða og umvæla øll sløg av trolum, so sum:**
■ Rækjutrol ■ Botntrol ■ Flótitrol ■ Semipelagisk trol

**Vit framleiða og umvæla snurpunótir til:**
■ Lodnu ■ Makrel ■ Sild

**Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:**
- Vaska og impregnera nótir
- Levera komplettar fortoyningar, akker, tog o.a.

**Annars hava vit alla útgerð til trol, nótir og alivinnuna**

**VÓNIN LTD.**

**Høvuðsskrivstova:**
Vónin P/F
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 444 246
Telefax 444 579
www.vonin.com

**Tórshavn:**
Álaker
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

**Miðvágur:**
Telefon 33 29 46






**Vit framleiða:**
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

◆◆◆**vælkomin inn á gólvið**

**SNØRISVIRKIÐ**
**í Klaksvík**
Tel. 455254 - Fax 457254
www.snorisvirkid.fo

**TEYMAVIRKIÐ**
**í Runavík**
Tel. 473000 - Fax 473001
www.teymavirkid.fo



## Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

**Sp/f Contrive Jsp Ltd.**
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

# Minningarhald í Porkeri



**Tann 1. november var minningarhald fyri teir sjólátnu við minnisvarðan í Porkeri, har fitt av fólki var til staðar. Røðuna helt John í Skemmuni, og endurgeva vit hana her.**

## Hann doyði fyri meg!

Vit eru komin saman her við minnisvarðan í Porkeri at minnast teir, ið lótu lívið á sjónum. Løtan er ein sorgarfull minnisløta, og ynskja vit at vísa teimum virðing og takksemi, sum fórust úti á havinum.

### Føroyingurin og havið

At vera føroyingur hevur altíð verið sett í samband við havið. Gjøgnum øldir hava føroyingar søkt ríkidømi havsins, og hevur ríkidømi tess lyft tjóðina upp at verða millum heimsins fremstu.

Gjøgnum hesar farnu øldir hevur tað eisini kostað føroyinginum at søkja ríkidømi havsins - havið hevur kravt mong mannalív, og hava mangar familjur sitið eftir heima í djúpari sorg, tá ið teirra kæru ikki vunnu upp land aftur.

Porkeri er ein av mongu bygdunum her á landi, ið eisini gjøgnum árini misti so nógvar av sínum á sjónum.

### Samanhald

Tað, ið hevur sermerkt føroyingar í farnari tíð, er samanhald og hjálpsemi í arbeiði á sjógv og á landi.

Menn hava trúliga arbeitt saman og hava gjøgnum fyrimyndarligt samanhald megnað at ført mangan fongin til lands. Teir spardu seg ikki, tá ið um galt at rætta hvør øðrum hjálpandi hond.

Hetta samanhald hevur gingið sum ein reyður tráður gjøgnum søgu okkara og hevur verið við til at skapt vælferðarsamfelag okkara.

Nógvar hugtakandi frásagnir eru at finna í sjómanssøgu okkara um hetta samanhald og hendan offurvilja millum fólk okkara.

### Lat lívið fyri vinmannin

Í Jóhannesar evangelium 15:13 lesa vit hesi orð, ið Jesus talaði við lærisveinar sínar: "Eingin hevur størri kærleika, enn at hann gevur lív sítt fyri vinir sínar".

Tá Jesus sigur hesi orð, vísir hann á, hvussu langt ein góður vinur kann fara, tá tað snýr seg um vin hansara - hann kann enntá fara so langt í offurvilja sínum, at hann vil geva lívið fyri vinin.

Ein slíkur tilburður, ið eg fyrstu ferð hoyrdi um sum smádrongur, hevur sett seg fast í sinni mítt og grípur meg, hvørja ferð eg hugsi um hann. Hann fór fram í 1927, tá sluppin Florence var ásigld og tók at søkka. Vanlukkuliga var støðan tann, at einans 10 av teimum 17 monnunum, ið við vóru, rúmaðust í bjargingarbátinum.

Ein av monnunum, Jaspur Tausen, ættaður úr Hovi, men búsitandi á Eiði, sum var bestimaður við Florence, var komin niður í bjargingarbátin. Eftir á søkkandi sluppini stóðu 7 menn, og millum teirra ein eldri eiðismaður, Marius Hansen, sum var vinmaður Jaspurs.

Jaspur hugsaði, at tað var ikki rætt av sær at verða í bjargingarbátinum, meðan vinmaður hansara varð eftir. Hann tók so hesa fyrimyndarligu og grípandi avgerð at fara upp aftur á Florence, og beyð vinmanninum at fara niður í bjargingarbátin í sín stað.

Úrslitið av hesum var, at meðan teir í bjargingarbátinum vórðu bjargaðir, sjólótust hinir, og teirra millum eisini Jaspur, bert 35 ára gamal, og eftir hann sat kona við 6 smábørnum.

### Skilnaðarløtan millum mann og konu

Kona Jaspurs var tuberklasjúk og lá á santoriinum, tá ið maðurin fór avstað seinasta túrin. - Ikki mundu tey gruna, at hetta var seinasta ferðin tey sóust her á fold. Áðrenn tey skiltust, sungu tey saman sálmin:

*Lad os vor møde i Himlen bestemme*
*muligt på jorden vi mødes ei mer!*
*Men hvor langt bedre at samles derhjemme,*
*der, hvor vor Jesus på tronen vi ser.*
*Der vi da skulle som Herrens forløste,*
*evigt beundre hans kærligheds raad,*
*der skal vi evigt med frydesang høste,*
*hvad vi her saa'de med sukke og graad.*

*Mødet i Himlen, o salig tanke!*
*Maatte den dybt ned i hjertene slaa,*
*at ikke sindet nu skulde omvanke*
*der, hvor ej Aanden sin næring kan faa.*
*Du, som har sager, der staar uafgjorte*
*skik dem til rette, o, gør det med flid!*
*Prøv alt, som indenfor Himmelens porte;*
*hastigt til ende er denne vor tid.*



### Guddómligur kærleiki

Hesin tilburður við Florence vísir okkum á nakað, ið vit øll hámeta - hetta, at ein maður gav lív sítt fyri sín vin. - Hvør ein kærleiki! - Og Jesus sigur, at hetta er størsti kærleiki, ið kann verða vístur á einum menniskjansligum støði. - Eingin hevur størri kærleika, enn at hann gevur lív sítt fyri vinir sínar.

Í Rómverjabrævnum 5 lesa vit eisini um at doyggja fyri ein annan, og síggja vit her talan at vera um at doyggja fyri ein vin og síðan at doyggja fyri ein fígginda:

"Neyvan fer nakar at doyggja fyri ein rættvísan - fyri hin góða (ein vin) kundi tað verið, at onkur hevði havt mót at doyð" (Róm. 5:7).

Víðari lesa vit: "Men Gud vísir kærleika Sín til okkara við, at Kristus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar" (Róm. 5:8).

Her síggja vit Gud at vísa ein upp aftur størri kærleika, ið eigur at fáa okkum at undrast - at Hann læt son Sín, Jesus, doyggja fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar - ella, meðan vit enn vóru, sum Paulus sigur í Kolossebrævinum 1:21, "fíggindar Hansara av sinnalagi".

### Sonur Guds tók okkara pláss!

Vit eru øll sum menniskju so at siga stødd á eini søkkandi skútu. Vit eru av náttúru dømd at doyggja, og tað er bert ein spurningur um tíð, til skútan søkkur.

Tað er bert ein, ið kann bjarga okkum. Hesin eini er Harrin Jesus Kristus. Av sinnalagi eru vit fíggindar Hansara - so man Hann vilja rætta okkum bjargandi hond?

Jú, á Golgata síggja vit Jesus so at siga at fara úr bjargingarbátinum og at stíga inn á søkkandi skipið, fyri at tú og eg kundu taka Hansara pláss og verða bjargað.

Hetta stig Harrans Jesusar, tá ið Hann tók okkara pláss, innibar eina ómetaliga líðing fyri Hann. - Hann var so illa viðfarin og rópti í einsemi doyggjandi: "Gud Mín, Gud Mín! Hví ert Tú farin frá Mær?" (Matt. 27:46).

Jesus doyði í staðin fyri okkum fyri at vit við trúgv á Hann - við at fara í bjargingarbátin, kundu verða bjargað.

Soleiðis, sum hesin vinur tók plássið hjá vinmanni sínum umborð á Florence, fyri at hann kundi verða bjargaður, soleiðis tók Jesus okkara pláss á Golgata, fyri at vit kundu verða æviga bjargað inn í ríki Guds.

### Neyðarróp á havinum!

Mangt eitt neyðarróp er rópt úti á havinum til Frelsaran um bjarging. Eg ivist onga løtu í, at mong ein sálin, ið har úti sá deyðan í eyguni, rópti á Harran Jesus um frelsu.

Hoyrdi Hann? Jú, Hann hoyrdi, tí vit lesa: "Hvør tann, ið kallar á navn Harrans, skal verða frelstur" (Róm. 10:13).

Víst sjólótust nógvir, men tó hoyrdi Hann teir, ið róptu. Hann svaraði teimum, rætti teimum hondina og tók teir inn í hin himmalska bjargingarbátin, sum førdi teir inn í stillu himmalsku havnina.

Hvør trygt at leggja út á ótrygga lívshavið og hava lagt seg í Hansara hond og vita, at hvat ið so hendir, so sleppir Hann mær aldri, heldur ikki, tá lívið fjarar av.

### Vit minnast teir, ið fórust

Teir, sum seinasta árið í samband við virki sítt á sjónum eru farnir, eru:

Karl Hansen, Glyvrar, 35 ár, doyði við Stapanum 3. des 2002.

Jóan Jacob Blástein, 59 ár, Vestmanna. Doyði umborð á "Hvannadali" 14.2.2003.

Hjalmar Guttesen, Tórshavn, 52 ár, druknaði í Havn 26. mars 2003.

Hanus Højsted, 57 ár, fórst í sínum starvi við Fugltúgvuni 6. mai 2003.

Marner Petersen, Klaksvík, doyði í sínum starvi við Helenu 19. oktober 2003.

Vit minnast hesa løtu hesar og allar teir, sum í farnum árum fórust á havinum. - Vit ynskja at vísa samhuga við teimum, ið mistu og sum sorgin kom inn hjá.

### Bøn

Góði Gud okkara, tú sum í Orði tínum eisini verður kallaður "Faðir Harra okkara Jesu Krists, Faðir miskunnar og Gud alrar troystar", vit takka tær fyri tey, ið tú eina tíð gavst okkum at liva saman við.

Vit takka tær fyri vinir okkara, fyri teir, ið á havinum fórust. Vit takka tær fyri tann kærleika og offurvilja, ið mangir teirra sýndu - heilt til at vilja geva lív sítt fyri vinir sínar.

Men, fram um alt, so vilja vit takka tær fyri tín ómetaliga stóra kærleika til okkara, okkum, sum høvdu vent okkum burtur frá tær og vóru fíggindar tínir av sinnalagi - at tú hóast hetta elskaði okkum og sendi tín Son til jarðar at taka pláss okkara og at doyggja fyri okkum.

Vit takka tær, kæri himmalski Faðir fyri, at sonur tín á Golgata so at siga fór upp úr bjargingarbátinum, fyri at vit kundu fáa loyvi at stíga niður í hann og soleiðis verða bjargað.

Takk fyri øll tey, sum eru stigin niður í bjargingarbát tín og takk fyri, at í hesum bjargingarbáti er pláss fyri øllum, sum vilja stíga niður í hann.

So vilja vit biðja fyri øllum teimum, sum mistu og sum syrgja, og leggja vit tey í hendur tínar, tú, sum er "Faðir miskunnar og Gud alrar troystar."

Takk fyri vónina, ið øll tey eiga, sum her í lívinum kallaðu á Teg, at vit skulu hittast aftur í stillu havnini, har eingin skilnaður og sorg meir skal verða.

Vit leggja siglandi fólk okkara í hendur tínar og takka tær fyri hetta góða landið, ið okkum fall í lut at búgva í.

Vælsigna tú alt fólk okkara, í Navni Harrans Jesusar.

Amen.



# KlokkuÓklár løgfrøði

## Fólk skulu ikki vita út ella inn, hvat er lógligt ella ikki.

Fyri at fólk skulu hava nakran sum helst møguleika fyri at finna útav, hvat ið er rætt ella skeivt í einum samfelag, er neyðugt við klokkuklárum mannagongdum. Tað má kunnu bera til at kunna fylgja við og at finna ein samanhang í teimum avgerðum, sum myndugleikarnir taka.

Tað er ikki so løgið um fólk t.d. ikki finna útav hvat ið gongur fyri seg í málinum um persónsupplýsingar. Men her skal verða gjørd ein roynd at lýsa tað við einum dømi, sum kundi verið úr dagligdegnum hjá einum og hvørjum.

### Byggiloyvið verður ikki tikið aftur, men…

Vit hugsa okkum til at trý fólk søkja um byggiloyvi á eini trøð, og at tey fáa hesi loyvi frá býarumsitingini samb. galdandi lógum og reglum.

Borgmeistarin hevur tó sett sær í høvdið at spenna bein fyri einum av hesum húsunum.

Hann veit, at hann kann ikki gera hetta, við bert at taka byggiloyvið aftur. Hetta hevði hann snøgt sagt ikki havt loyvi til, tí ein tilsøgn givin av einum myndugleika er bindandi.

Ístaðin ger borgmeistarin eina kunngerð við afturvirkandi kraft. Hon er skræddaraseymað til at leggja fótonglar fyri júst hesum eina húsinum. Kunngerðin er bert galdandi fyri hús sum eru stoypt, tí bert hesi húsini eru stoypt.

Tískil verður ásett, at tað skal ikki verða loyvt at tekja hús, sum eru stoypt. Hetta vil hava ta ávirkan, at byggiloyvið verður virðisleyst og verður afturtikið "gjøgnum bakdyrnar". At borgarin hevur nýtt ein hóp av peningi í hesi bygging, metir borgmeistarin ikki at vera sín trupulleika. Tað má borgarin um.

Um hetta veruliga hendi í t.d. Tórshavn, hevði borgmeistarin í minsta lagi verið settur frá í stundini og helst hevði hann verið innisperraður eisini. Men hetta hevði ikki hent í Tórshavn, tí býurin verður hóast alt stýrdur eftir ávísum reglum, sum forða fyri slíkari maktmisnýtslu.

### Sama søgan við persónsupplýsingum

Tað er stórt sæð hetta, sum er gingið fyri seg í málinum um persónsupplýsingar.

Elektron fær eitt púra greitt loyvi, sum er givið fult út samb. galdandi lóggávu og kunngerðum. Samb. øllum meginreglum í einum rættarsamfelag, hevur Elektron alla grund til at virka samb. hesum loyvi, og tað hava teir eisini gjørt.

Eitt slíkt loyvi kann ikki takast aftur. Og her er nóg mikið at vísa til støðuna hjá Føroya Rætti, sum er endurgivin í hesi grein.

Men okkara "løgmálaráðharri" hevur sett í seg, at hann fyri einhvønn prís skal forpurra hetta loyvi. Hetta gjørdi hann eisini áðrenn loyvið varð givið við eini kunngerð. Men dataeftirlitið metti, at júst henda kunngerðin gav heimild til givna loyvi. Hetta skuldi fyri so vítt avgjørt málið. Um umrødda kunngerð ikki var í samsvar við "løgtingsins vilja", skuldi hetta verið ein trupulleiki hjá tí landsstýrismanni, sum hevur gjørt kunngerðina og ikki hjá tí, sum hevur fingið loyvið.

Tað vildi verið ein partur av demokratisku skipanini, at tá skuldi ráðharrin lagt frá sær.

Í staðin kemur hann í stríð við allar meginreglur innan fyrisiting við eini nýggjari kunngerð við afturvirkandi gildi, sum, eftir viðgerð í dataeftirlitinum, hevur fingið tað merkisverda úrslit, at samb. galdandi rættarreglum ber ikki til at taka loyvi aftur. Men tað verða setta slíkar nýggjar treytir við givna loyvið, at tað harvið kann gerast óbrúkiligt.

Afturat hesum er greitt, at nógv onnur enn júst Elektron nýta somu mannagongd at flyta upplýsingar av landinum, sum nú skal steðgast hjá Elektron.

Tann spurning, ið hetta mál reisir er fylgjandi:

Kann tað vera í samsvar við meginreglur í einum rættarsamfelag, at tað fyrst verður staðfest, at loyvið kann takast aftur. Ment at tað síðan verður lagt slíkar forðingar í vegin, at loyvið verður virðisleyst!

Hesin spurningur er ikki settur og enn minni svaraður!

## Føroya Rættur staðfest: Givin tilsøgn er bindandi!

Greið niðurstøða

Dómarin staðfestir her m.a.:

Under henvisning til

......

*at afgørelsen er til skade for sagsøgeren, idet denne har stiftet selskabet og iværksat projektet, delvis på baggrund af den tilladte finansiering og de øgede indskuds- og lånemuligheder dette bevirkede, samt at der ikke foreligger en væsentlig begrundelse for sagsøgte (Fiskimálaráðið), herunder at det ikke ses at være en væsentlig ændring i det faktiske grundlag, findes betingelserne for at tilbagekalde bevillingen ikke at være til stede.*

*Hetta er niðurstøðan hjá Føroya Rætti í einum máli, har Fiskimálaráðið fyrst hevði givið borgarum eina tilsøgn fyri síðan at taka hana aftur. Hetta ber snøgt sagt ikki til samb. vanligum umsitingarligum meginreglum. Hesa niðurstøðu hjá rættinum hevur fiskimálaráðið góðkent.*

*Ørskapurin á fyristingarliga økinum verður annars undirstrikaður av, at sama aðalráð nú koyrir eina sak við "Jógvan S", har pástandurin er tann mótsatti av, hvat teir júst hava játtað í hesum málinum.*

*Løgfrøðin í hesum máli er eisini grundin fyri at Dataeftirlitið ikki kann taka loyvið frá Elektron.*

*Men spurningurin er so: Ber til í einum rættarsamfelag at kvala skipanina við at seta avmarkingar, sum ger loyvið virðisleyst?*

# Skotland flýtur yvir av hýsu

**Tað er ikki bara í Føroyum at illa gongst at sleppa av við hýsuna. Størsta fiskimanna Producer Organisation PO í Bretlandi, Scottish Fishermens Organisation (SFO) hevur higartil í ár sent 1600 - 1700 tons av hýsu til mjølframleiðslu. Hýsan verður tikin aftur av marknaðinum við stuðuli frá ES.**

Hýsan er blivin ein trupulleiki hjá fiskimonnum í øllum Evropa. Fiskimenn í Føroyum hava leingi klagað yvir at prísurin á hýsu er lágur og at tað viðhvørt er trupult at sleppa av við hýsuna. Norska blaðið Fiskeribladet hevði í síðstu viku eina grein við m.a. tølum frá SFO, sum vísa at fiskivinnan í Norra ella Føroyum er ikki einsamøll við stríðnum at fáa lønsemi í søluna av hýsu. Tað er minst líka illa statt í Bretlandi og serliga skotskir fiskimenn hava stórar trupulleikar við at sleppa av við hýsuna.

Hetta er orsøkin til at 1600 -1700 tons av hýsu higartil í ár eru tikin aftur av marknaðinum og send til ídnaðarvirkir til mjølframleiðslu.

"Tað hendir av og á at smáar nøgdir av hvítfiski verða tiknar aftur av marknaðinum, men eg minnist ikki líknandi dømi tá so stórar nøgdir av hvítfiski eru sendar til mjølframleiðslu," sigur Eric Gibson í Scottish Fishermens Organisation (SFO). Hann sigur víðari at hendan mjølframleiðslan í høvuðsheitunum fór fram í tíðarskeiðinum juli til september.

SFO er tann størsti "framleiðslufelagskapurin" í Bretlandi við meira enn 400 fiskiførðum sum limum. SFO umsitur marknaðarskipanina hjá ES, sum loyvir at senda matfisk til mjølframleiðslu tá marknaðurin ikki rindar nóg høgan prís. PO felagsskapirnir kunnu áseta ein minsta prís eftir einari ávísari skipan við referansuprísunum hjá ES. Tá marknaðarprísurin fellur undir 80 prosent av minstaprísinum, kann fiskurin verða tikin aftur av marknaðinum og burturbeindur ella malin til fiskamjøl. Fiskimennirnir fáa í slíkum førum rindaðan ein sokallaðan afturtøkuprís uppá 80 prosent.

Bretland hevur eina samlaða hýsukvotu uppá 25.000 tons í 2003. Av hesum ráða limirnir hjá SFO yvir 9.300 tonsum. Tað hevur ikki eydnast at fáa tøl fyri, hvussu nógv tilsamans er tikið aftur av marknaðinum í Bretlandi. Tað er eftir øllum at døma munandi størri tøl enn talið, sum SFO kann leggja fram.

Hýsan, sum er tikin av marknaðinum er í størsta mun smá hýsa. Øll eru samd um at hesin fiskurin heldur átti at svomið í sjónum nøkur ár afturat. Men av tí at toskurin manglar hevur hýsan størri týdningi í veiðuni enn fyrr. Um hýsukvotan ikki øll verður fiskað í ár, kann tað fáa avleiðingar fyri støddina á kvotuni næsta ár.

Síðsta fríggjadag steðgaðu skotsku fiskivinnumyndugleikarnir toskaveiðuni hjá SFO. Kvotan uppá smá 2.400 tons er fiskað í ár. Gjøgnum alt árið er hendan lítla toskakvotan brúkt sum hjáveiðukvota í øðrum fiskiskapi. Hýsukvotan røkkur til eina ella tvær vikur afturat, so verður eisini veiðusteðgur har. Hetta er fyrstu ferð at skotskir fiskimenn hava fiskað kvotuna á teimum týdningarmiklastu fiskaslógunum tá tveir mánaðir eru eftir av árinum.




FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Ring um lýsingar á tlf. 31 15 69
ella send eitt fax á 31 87 69
gevur
MEIRI fyri
MINNI



– Góðgæti
– Vikubløð
– Soft ice
– Milk shake
– Bakaravørur
– og mangt annað

**Kioskin hjá Ingu**
v/ Ingu Joensen
Sandavágur – tlf. 333839


# Jørgen heldur fyrilestur í London

Fyrrverandi landsstýrismaðurin skal greiða fiskivinnuni í Onglandi og Skotlandi frá, hvussu føroyska fiskidagaskipanin virkar.

Tað er misnøgd við kvotaskipanir, sum ger, at fiskimenn uttanlands vilja sleppa at hoyra, hvusu tann føroyska fiskidagaskipanin virkar. Jørgen Niclasen hevur fyrr verið uttanlands og greitt frá skipanini, og nú eru tað enskir og skotskir fiskimenn, sum vilja frætta um føroysku skipanina.

Í morgin skal Jørgen Niclasen halda fyrilestur fyri fiskimonnum, fiskifrøðingum, politikarum og embætismonnum á einum fundi í London, og haðani fer hann til Peterhead, har umboð fyri skotsku fiskivinuna vilja sleppa at hoyra hann siga frá.

Fyrilesturin hjá Jørgeni Niclasen eitur "At liva við náttúruni".

*Kelda: Føroyski Portalurin*





- men álvaratos, var tað hetta, tú ætlaði tær, Álvur?

At seta búgv er ikki bara sum at siga tað. Sjálvt eini smá hús kunnu kosta nógvan pening og í flestu førum merkir hetta, at tú bindur teg í mong ár.

Hví ikki byrja at spara saman nú? Byrjar tú í góðari tíð, kanst tú sleppa undan at taka stór lán, og tú fært betri ráð at vera í húsunum.

** Tú skalt vera fylt/ur 16 ár, um tú skalt stovna bústaðarkonto.*

Við Bústaðarkonto hevur tú møguleika at spara 240.000 kr. upp yvir 8 ár. Harumframt fært tú høga innlánsrentu frá bankanum, umframt 3% í rentustudningi frá landskassanum. Tað ger mun!

Les meira um Bústaðarkonto á www.foroyabanki.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við starvsfólk bankans.

Vit geva tær betri ráð.

FØROYA BANKI





# Mistu og fingu

Ikki av hjarta Guð plágar
og nívir mannanna børn.

Harmlj. 3,33

Í einum blaði greiddu eini norsk hjún frá, hvussu Gud, ígjøgnum sjúku dóttir teirra, fekk tey í talu.

Dóttirin varð fødd við einum álvarsligum og lívshóttandi hjartafeili, sum ikki kundi gerast nakað við í Noregi. Tey fluttu tí til Onglands, og búðu har í fleiri ár, fyri at verða nær tí sjúkrahúsi, sum kundi hjálpa dóttrini, um ein "organdonorur" kom, sum kundi geva henni bæði hjarta og lungu.

Bíðitíðin gekk frá vikum, mánaðum til ár. Dóttirin versnaði, og vandi var fyri, at hon doyði í bíðirøðini.

Hetta var ein trupul og strævin tíð hjá allari familjuni.

Ein dagin frættu tey um tað norsku sjómanskirkjuna í London, og sjómanspresturin frætti um tey. Presturin setti seg í samband við tey beinanvegin, og hjálpti teimum við ymiskum. Samstundis bað hann tey koma at vitjað kirkjuna.

Sjómanskirkjan bleiv teirra annað heim, sosialt, og við tíðini eisini andaliga.

Tey bæði, ið áður hugsaðu lítið um kristindómin, kendu seg væl í kirkjuni, og byrjaðu at hjálpa til við ymiskum. Tey blivu eisini fastir altarsgestir.

Langt um leingi fingu tey brádliga ein dag boð frá sjúkrahúsinum um, at dóttirin kundi fáa nýtt hjarta og nýggj lungu.

Undir tí stóru skurðviðgerðini, stungu trupulleikar seg upp, við tí úrsliti, at dóttirin doyði fimm dagar seinni.

Foreldrini blivu ikki beisk, hóast tað var hart at missa hana.

Niðurstøðan og vitnisburðurin frá mammuni ljóðaði soleiðis:

- "Gud gav okkum dóttrina. Møguliga var ætlan hansara tann, at vit skuldu koma til trúgv ígjøgnum arbeiðið hjá sjómanskirkjuni. Dóttirin var møguliga Guðs amboð í okkara lívi"-

Tey mistu nógv. Ígjøgnum tað, fingu tey eisini nógv - trúnna á Jesus.

Guðs vilji og ynski er, at menniskju - við at hoyra gleðiboðskapin, koma til hansara, biðja um frelsu og takka fyri náði og umsorgan.

Hendir hetta ikki, verður Guð viðhvørt noyddur at "rista" í fólk, fyri at fáa tey í talu, fáa tey at lurta, síggja og fata frelsu og góðsku sína.

Hetta er ikki tann arbeiðsháttur, ið Guð, sum er kærleiki, dámar best, - men hann kann verða neyðugur.

Kærleikin kann verða harður, tá tann elskaði er í vanda, tí hann ikki vil lurta - geva gætur. "Tí at ikki av hjarta Guð plágar og nívir mannanna børn"

Leita tí til Guðs, við bøn um fyrigeving og náði, og lat

"Guðs góðsku leiða teg til umvendingar" Róm.2,4

*Drag meg, o, Jesus, alt, sum í mær*
*hindrar og skuggar, rætti eg tær!*
*Alt tað, ið forðar, kennir best tú,*
*alt okkum skilur, o, tak tú tað nú!*

*Ms.515*

Select

# Leiðari til Shell-støðina í Gøtudali!

Søkt verður eftir støðleiðara til Shell-støðina í Gøtudali, at byrja skjótast tilber.

**Starvið:**
Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi starv, sum dagligur leiðari á Shell-støðini. Støðin er ein sonevnd **Select-støð**. Hetta eru sera nýmótans støðir, ið leggja dent á at veita kundunum bestu tænastu og eitt serliga stórt vøruúrval, m.a. nýbakað breyð, pylsur, tips & lotto umframt allar bilvørur, sjálvandi.

**Eginleikar:**
Vit ímynda okkum at umsøkjarin

- hevur góð leiðsluevni
- er ein góður seljari
- er iðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar

**Løn:**
Vit bjóða eina løn við eftirlønarskipan, ið verður ásett í samsvari við útbúgving og royndir.

**Umsóknir:**
Áhugað kunnu senda umsókn við neyðugum skjølum og merkt "Støðleiðari" til P/F Føroya Shell, Viðarnes, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 28. november 2003. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara á telefon 347400.

www.shell.fo

Team BS • 358030

**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

FARPACK

Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

DANAK
DNV



# Línubustir og goggar

Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar

Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

**Fløttislið** (limur í Føroya blindafelag)

## dagsins MYND



*Mourentzius Rensistein t.h. í lagarinum á "Másanum".*

Vit hittu Mourentzius Rensistein í lugarinum á "Másanum". Ressi var á veg til Hattarvíkar, hagani hann er ættaður. Ressi skuldi fara á fjall. Hann er 77 ára gamal, men er framvegis til skips á hvørjum ári, og er avgjørt ein av teimum elstu virknu fiskimonnum vit hava. Hann er eisini virkin sum varasóknarformaður í fiskimannafelagnum.

Annars er Ressi gudsonur Eliesar á Kirkju, sum vit júst hava havt samrøðu við. Men fríggjadagin í næstu viku verður Eliesar 98 ár, so nú heldur hann seg vera leysan av teirri skyldu, sum hann tók á seg sum 14 ára gamal, mótvegis Ressa!

Vit ynskja Eliesari tillukku við degnum.

## Koyrið við Maersk Air

Um tú hevur ein Maersk Air bannara á bakrútinum á bili tínum, kanst tú vinna ferðaseðlar til ferðamál á rutunetinum hjá Maersk Air. Drigið verður millum luttakararnar og tey hepnu kunnu vænta sær vitjan av Maersk Air. Hava tey tá bannaran á bilinum, vinna tey.

| | |
|---|---|
| 1. vinningur | 2 ferðaseðlar til eitt ferðamál á rutunetinum hjá Maersk Air umvegis Keypmannahavn. Til dømis Athen, Paris, Barcelona ella Milano |
| 2. vinningur | 2 ferðaseðlar til London |
| 3.–5. vinningur | 2 ferðaseðlar til Keypmannahavnar/Billund |
| 6.–10. vinningur | Ítróttartaska |

Vitja eisini okkara nýggja handil á **www.maersk-air.fo**

Tú kanst melda teg til og heinta bannaran á skrivstovuni hjá Maersk Air í Havn. Ella vit kunnu senda hann við postinum.
Seinasta freist at melda seg til er 17. november 2003. Vinnararnir verða funnir síðst í desember 2003.

Maersk Air · Handilskjarnin · FO-100 Tórshavn · Tel.: 35 74 74 · Fax: 35 74 75

MAERSK AIR
It's got to be perfect

## VW POLO 1,6

Sera væl hildin VW Polo 1,6 við 75 hk til sølu. Bilurin hevur einans koyrt 26.000 km og er í ógvuliga góðum standi. Felgur við píkadekkum fylgja við bilinum.

Tlf. 31 19 96
ella 25 64 94



Einans
69.000,-

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569




Ein kona ringdi til løgregluna, fyri at boða frá, at maður hennara var blivin burtur.
Eru tað nøkur boð eg skal geva honum, um vit finna hann? spurdi løgreglumaðurin.
-Ja, sig við hann, at mamma mín ikki kemur at vitja kortini.

*****

Hann kom fullur frá arbeiði klokkan níggju um kvøldið, og legði seg beinan vegin. Klokkan fýra um morgunin ringdi vekjarin, og hann spurdi konu sína: Hví hevur tú sett vekjarin at ringja klokkan fýra um morgunin?
-Tað skal eg so væl siga tær. Tá tú nýtir fýra tímar at koma frá arbeiði, nýtist tær ivaleyst eisini fýra tímar at koma til arbeiðis.

*****

Tveir skotar møttust og tosaðu um gamlar dagar, tá ið tann eini sigur:
- Tú stamar jú ikki meira. Nær ert tú hildin uppat við tí?
- Tá ið eg skuldi ringja til Australiu frá einari mynttelefon.

*****

-Vit hava ætla okkum at gera eitt fótbóltslig. Kundi tú hugsa tær at verið við?
-Tað vildi eg fegin, men eg havi tíverri ikki skil fyri fótbólti.
-Tað ger einki. Vit hava eisini brúk fyri einum dómara.

*****

Eg havi hoyrt at konan er stungin av.
-Tað stemmar.
Við kassameistaranum?
-Tað stemmar.
Og hvat so vi kassanum?
-Hann stemmar ikki.



*Lars Storr lækni greiddi frá apopleksi.*



*Dennis Holm legði fram kanningina um støðuna hjá apopleksiraktum.*

# Pallborðsfundur hjá Heilafelagnum

Leygardagin 9. november, skipaði Heilafelagið fyri einum pallborðsfundi í Útvarpshøllini. Her var fitt av fólki til staðar.

Høvuðsendamálið við fundinum var, at leggja fram eina kanning av viðurskiftunum hjá teimum, sum hava havt apopleksi, t.v.s. blóðtøpp ella heilabløðing.

Fyrst á fundinum var framløga. Læknin Lars Storr greiddi frá, hvat apopleksi var, og hvør viðgerðin er. Hann legði eisini dent á, hvat ið kundi gerast, fyri at fyribyrgja, at verða raktur av hesi sjúku.

Hann segði, at tey eru 90-100, sum árliga verða rakt. 20% doyggja. Uml. 40% koma heilt fyri seg, meðan onnur 40%, ikki koma fyri seg aftur. 5-10% kunnu rokna við at fáa ein nýggjan tilburð. Tey, sum ikki koma fyri seg, kunnu t.d. vera lammað í aðrari síðuni. Og alt eftir, um viðkomandi er lammaður høgru ella vinstrumegin, kann ein missa taluevnini, og ger hetta sjálvsagt støðuna enn verri.

Hetta er ein sjúka, har fólk kunnu gera nakað sjálvi fyri at fyribyrgja henni. Eitt tað mest avgerandi er, at lata vera við at roykja, og síðan ansa eftir, hvat ið etið verður. Tað hendir tó meira enn so, at fólk, ið gera alt tað "rætta", kortini verða rakt.

Hendir hetta, er umráðandi, at fáa læknaviðgerð sum skjótast, og tá ein er komin í viðgerð, er umráðandi at fáa uppvenjing sum skjótast.

## Kanningin og tørvur á ábót

Dennis Holm, frá Granskingardepilin fyri Økismenning, legði fram frágreiðina, sum hann hevur gjørt vegna Heilafelagið. Vit fara at koma aftur til hesa frágreiðing í einum seinni blað.

Frágreiðingin er grundað á eina spurnaðarkanning millum fólk, sum eru rakt av apopleksi í Føroyum, og sammett verður við viðurskifti í Danmark. Og her er greitt, at okkara apopleksiraktu eru verri fyri enn tey, sum eru í somu støðu í Danmark.

Dennis Holm vísti á nøkur øki, har tað er tørvur á, at gera nakað munagott:

- Tørvur er á einum intensivum eftirviðgerðar- og uppvenjingarstovni.
- Tørvur er á betri tænastum frá Almannastovuni.
- Tørvur er á betri samstarvi og samskifti millum heilsuverkið og almannaverkið.
- Tørvur er á skipanum, sum seta apopleksirakt ígongd aftur eftir skaðan.
- Tørvur er á mannagongdum og seingjaplássum.

Hetta er ikki smávegis, og nógv er at fara í holt við hjá øllum pørtum. Tað, sum eisini er tørvur á, er eitt upplýsimgararbeiði, um hvønn rætt fólk hava. Hetta er ein uppløgd uppgáva hjá Heilafelagnum. Hetta letur seg eisini hampiliga væl gera við alnótini og heimasíðum.

Seinastu framløguna hevði Napoleon Joensen, sum fyri nøkrum árum síðan fekk heilabløðing. Hann greiddi frá, hvussu hann upplivdi hetta, og hvussu hann eftir langa sjúkralegu kom seg so frægt aftur, at hann kundi hava eina slíka framløgu. Hetta var í sær sjálvum ein lívsjáttandi frásøgn.

Aftaná var so pallborðsorðaskifti við luttøku av teimum viðkomandi pørtunum í hesum máli. Ein lyklapersónur, Páll á Reynatúgvu, hevur ein serligan førleika á hesum øki, nevniliga sum fysioterapeutur. Tað er slíkir, sum fyri ein stóran part, taka sær av viðgerðini hjá teimum, sum verða rakt. Tað er heldur eingin ivi um, at framstig henda. Men langt er á mál.

At enda hevði Elin Súsanna Jacobsen hugleiðingar um tað, at vera ein bólkur í samfelagnum, ið er annarleiðis.

Mett verður, at uml. 1% av fólkinum, verða rakt av apopleksi. Hetta merkir, at tað er ein nógv størri bólkur, sum eru avvarðandi. Ein háttur at stuðla teimum, sum verða rakt, er, at gerast limur í Heilafelagnum. Hetta kann gerast við at flyta limagjald kr. 150 á eina av hesum konti:

Føroya Sparikassi
1270046

Føroya Banki
4995408

Postgiro 78050

Annars hevur Heilafelagið eisini søkt fíggjarnevndina hjá løgtinginum, um at fáa eina upphædd játtaða á fíggjarlógini, og eigur hon at vera á sama støði, sum onnur líknandi feløg.

*Napoleon Joensen greiddi frá, hvussu tað var at vera raktur av apopleksi.*

